| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>22. mai 2025 | Blað nr.: 314<br>Forkvinnunnar merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 22. mai 2025 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 120/25 – 139/25**

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Fríður P. Dalsgarð
Eyðfríð Jacobsen
Hermann Mortensen
Mortan Simonsen
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Haraldsen, Anna Havmand og Olga Knudsen

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>22. mai 2025 | Blað nr.: 315<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðir**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 120/25 | 25/00163-1 | Mál beind í nevndir 2025 | 317 |
| 121/25 | 25/02320-1 | Gøtunavnanevndin: Áheitan á Gøtunavnanevndina um at finna nýtt veganavn til part av Sundsvegi, í samb. við at Innkomuvegurin sker vegin av | 319 |
| 122/25 | 25/02321-3 | Gøtunavnanevndin: Áheitan á Gøtunavnanevndina um at finna navn til Innkomuvegin | 321 |
| 123/25 | 25/01677-1 | Matarskipan til børn og ung í Tórshavnar kommunu | 323 |
| 124/25 | 25/03407-1 | Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - bráðfeingis tørvur á hølum næstu tvey skúlaárin | 330 |
| 125/25 | 25/01548-1 | Miðbýarætlan - Havnará - 21/00407 | 335 |
| 126/25 | 25/00315-1 | Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali | 337 |
| 127/25 | 25/02603-1 | Umsókn til ummælis um sundurbýti og samanlegging millum matr. nr. 139a og 1og, Hoyvík | 339 |
| 128/25 | 25/04664-4 | Dagføring av serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir | 344 |
| 129/25 | 25/02294-3 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1357b, 1356 og 1355, 1354a og 1354b, Tórshavn | 347 |
| 130/25 | 25/00863-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 139a, Hoyvík - Vinnuøkið á Ovara Hjalla, | 350 |
| 131/25 | 25/00954-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið | 353 |
| 132/25 | 25/04941-4 | Øking av vatngoymsluni í Villingadali | 358 |
| 133/25 | 25/00319-1 | Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum - 22/03066 | 360 |
| 134/25 | 25/05413-1 | Koyripeningur til býráðs- og nevndarlimir | 366 |
| 135/25 | 25/00436-14 | Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum - 20/03903 | 369 |
| 136/25 | 25/04951-2 | Umsókn um stuðul til ítrótt og frítíðarvirksemi, Andrass Thomsen | 373 |
| 137/25 | 25/02905-4 | Dagføring av sertstøku byggisamtyktini fyri Argjaboða, matr. nr. 43g og 43h, Argir | 376 |
| 138/25 | 25/00093-7 | Innskriving í forskúla, fyrsta flokk og frítíðarskúla skúlaárið 2025/26 | 379 |
| 139/25 | 25/05714-1 | Limaskapur í Kommunufelagnum | 392 |

**Til viðgerðir**

## 120/25 Mál beind í nevndir 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 34/25 | 25/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 49/25 | 25/00163-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 68/25 | 25/00163-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 96/25 | 25/00163-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 120/25 | 25/00163-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Tikið til eftirtektar.

| Býráðsfundur<br>22. mai 2025 | Blað nr.: 319 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

# 121/25 Gøtunavnanevndin: Áheitan á Gøtunavnanevndina um at finna nýtt veganavn til part av Sundsvegi, í samb. við at Innkomuvegurin sker vegin av

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 25.02.2025 | 4/25 | 25/02320-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 12.03.2025 | 38/25 | 25/02320-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 02.04.2025 | 59/25 | 25/02320-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 99/25 | 25/02320-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.05.2025 | 74/25 | 25/02320-1 |
| 6 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 121/25 | 25/02320-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Tekniska umsiting hevur heitt á Gøtunavnanevndina um at finna nýtt navn til ovasta part av Sundvegnum.
Ovasti partur av Sundsvegnum er skorin av, í samb. við at Innkomuvegurin er gjørdur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Gøtunavnanevndin 25. februar 2025:** Nevndin mælir til, at ovasti partur av Sundvegnum fær navnið «undir Villingafossi»**.**

**Mentamálanevndin 12. mars 2025:** Umrøtt.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 07. mai 2025:** Nevndin tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at tann parturin av vegnum, sum er skorin av, framhaldandi eitur Sundsvegur lika niðan á endan.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini um at vegurin framhaldandi skal eita Sundsvegur líka niðan á endan.

# 122/25 Gøtunavnanevndin: Áheitan á Gøtunavnanevndina um at finna navn til Innkomuvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 25.02.2025 | 2/25 | 25/02321-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 12.03.2025 | 39/25 | 25/02321-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 02.04.2025 | 60/25 | 25/02321-3 |
| 4 Mentamálanevndin | 07.05.2025 | 75/25 | 25/02321-3 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 122/25 | 25/02321-3 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Tekniska umsiting heitir á Gøtunavnanevndina at taka støðu til, um innkomuvegurin kann eita “Innkomuvegurin”, ella koma við uppskoti um annað navn.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
skjal 25/02321-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**

**Gøtunavnanevndin 25. februar 2025:** Ein meiriluti, Marjun Arge Simonsen, Ronnie Thomassen og Annfinnur Hjelm, mælir til, at innkomuvegurin fær navnið «Ytri Ringvegur».

Ein minniluti, Jógvan Arge og Marius Rein, mælir til, at innkomuvegurin fær navnið «Havnarvegur».

**Mentamálanevndin 12. mars 2025:** Umrøtt.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2025:** Útsett.

**Ískoyti:**
Grundgevingar fyri navnauppskotum liggja sum skjal 25/02321-7, í hesum málinum.

**Mentamálanevndin 07. mai 2025:** Samtykt at vegurin fær navnið «Havnarvegur» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini um at vegurin fær navnið «Havnarvegur».

# 123/25 Matarskipan til børn og ung í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.01.2025 | 4/25 | 25/01677-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 13.02.2025 | 10/25 | 25/01677-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 08.05.2025 | 32/25 | 25/01677-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 88/25 | 25/01677-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 123/25 | 25/01677-1 |

**Upprunin til málið**
Tjóðveldi í Tórshavnar býráði ynskir at fáa mál á skrá til komandi býráðsfund um matarskipan í Tórshavnar kommunu við heitinum Matarskipan til børn og ung í Tórshavnar kommunu

**Lýsing av málinum**
Matarskipan í barnagørðum og skúlum verður mett sum ein góð tænasta fyri at veita heilsugóðan mat í tíðini, børnini eru í skúla ella í barnagarði. Royndir í øðrum londum vísa greitt, at ein góð matarskipan er góð fyri trivnaðin hjá børnum. Ein góð matarskipan tryggjar eisini, at okkara børn og ung fáa javnbjóðis atgongd til heilsugóðan mat og stimbrar undir, at næmingar og børn gerast forvitin eftir at royna nýggjan mat. Harnæst kann ein matarskipan stuðla undir føroyskari framleiðslu av grønmeti, læru um burðardygga matmentan og gagnnýtslu av tilfeingi, sum er í nærumhvørvinum.

Matarskipanir í londum kring okkum eru ymiskar, og tí er tað týdningarmikið, at ein matarskipan verður ment, sum egnar seg til Tórshavnar kommunu. Her eiga vit eitt nú at kanna, hvør verandi áhugin hjá børnum, ungum og foreldrum er til eitt slíkt tilboð, hvørt skipanin eigur at verða útbygd stigvíst, og hvussu ein matarskipan kann menna føroysku matskipanina sum heild, millum annað við øktari grønmetisframleiðslu og gagnnýtslu av fiskatilfeinginum.

Tjóðveldi í Tórshavnar kommunu skjýtur tí upp, at arbeitt verður við eini ætlan fyri, hvussu ein matarskipan í Tórshavnar kommunu kann skipast.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
23/03043 Kanna møguleikar fyri at seta í verk matarskipan fyri dagstovnaøkið
19/03706 Matskipan í Skúlanum á Fløtum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

## Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið í mentamálanevndina og trivnaðarnevndina.

**Ískoyti:**
Sum víst verður til omanfyri eru fleiri mál og samtyktir um matarskipan til dagstovna- og Skúlaøkið

Í mál nr. 23/03043 hevur mentamálanevndin tann 07. Juni 2023 samtykt at B&U skal seta arbeiðsbólk at greina hvussu ein matarskipan kann setast í verk á dagstovnaøkinum. Síðani er kunning um meting av tørvi og kostnaði av at uppnormera køksfólk løgd fyri mentamálanevndina, sum hevur samtykt at umsitingin fær til vega eina uppgávulýsing. 05. Juni 2024 hevur mentamálnevndin ynskt at umrøða málið, men tað var tikið av skrá.

Í málið nr 19/03706 byrjaði viðgerð í mentamálanevndini, nú trivnaðarnevndin, av at seta í verk matarskipan í Skúlanum á Fløtum, sum hevur ein framleiðlsukøk. Eftir nakrar viðgerðir fekk málið 15 apríl 2021 eina vend har umsitingin var biðin um uppskot til arbeiðssetning til gerða av einum yvirksipaðum kostpolitikki, harundir matarskipan v.m., eitt nú til skúlanæmingar, dagstovnabørn, eldri og har kommunan veitir mat, og at uppskotið verður lagt fyri avvarandi nevndir. Steðgur kom síðani í málið og var tað tikið uppaftur 10. mars 2022, við tilmæli um at avmarka arbeiðssetningin til Skúla og frítíðarskúlaøkið, sum Trivnaðarnevndin samtykti. Síðani er ikki meira hent í hesum málinum.

Samstundis sum hetta málið um matarskipan til børn og ung í Tórshavnar kommunu er reist í býráðnum, hevur kommunan móttikið eina umsókn um fíggjarligan stuðul til eina verkætlan, við tí endamálið at seta í verk eina matarskipan til dagstovan og skúlaøkið í kommununi.

Málið j.nr. 24/07393 verður lagt fyri Mentamálanevndina og Trivnaðarnevndina á nevndarfundi fyrst í oktobur. Her er í fyrstu syftu talan um eina pilotverkætlan, sum kann blíva eina varandi matarskipan fyri dagstovna- og skúlaøkið í Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, mentamáladeildarleiðarin og leiðarin á Børn og Ung mæla til, at arbeiðsbólkur verður settur til at gera uppskot um matarskipan fyri dagstovnaøkið og fyri fólkaskúlaøkið í Tórshavnar kommunu. Mælt verður til, at umsitingin leggur fram uppskot um arbeiðssetning, samanseting av arbeiðsbólki og møguligari fígging, fyri mentamálanevndina og trivnaðarnevndina til komandi nevndarumfar.

**Mentamálanevndin 02. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Trivnaðarnevndin 03. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Forkvinnan í undanfarnu trivnaðarnevndin avgjørdi at steðga á við viðgerðini av hesum málinum um matarskipan fyri børn og ung í sambandi við býráðsvalið, og málið verður nú lagt fyri trivnaðarnevndina aftur, so støða kann takast til hvørja kós nýggja trivnaðarnevndin ynskir at seta í málinum.

Her er eitt upplegg til kjak:

<u>Stødd og møguligur kostnaður av eini matarskipan.</u> Sum dømi fer skúlaøkið við 3.100 børnum og einum miðalkostnaði pr. dag á 50 kr. at geva ein samlaðan rakstrarkostnað á 30 mió. kr. Eitt foreldragjald á 500 kr./mðr. yvir 10 mðr. gevur eina inntøku á uml. 15 mió. kr., um øll væl at merkja ynskja tænastuna. Eftir einum slíkum leisti verður árligi rakstrarkostnaðurin sostatt umleið 15 mió. kr.

<u>Dygd og tænasta.</u> Miðalkostnaður á uml 50 kr. fyri barnið verður mettur at røkka til ábit og høvuðsmáltíð og til dygdargóðan mat.

<u>Hvat skal endamálið við eini matartænastu verða?</u>
- At tryggja børnum og ungum javnbjóðis atgongd til heilsugóðan mat
- Veiting av heilsugóðum mati í leypi av dagstovna- og skúladegnum
- At geva matnáðir og stimbra undir føroyska matmentan
- Veiting av fjølbroyttum mati, ið stimbrar matdirvi (forvitni)
- At varðveita og menna føroyska matframleiðslu, eisini av grønmeti
- At veita vistfrøðiligan og umhvørvisvinarligan mat.

<u>Fyritreytir fyri matarskipan.</u>
Á nýggjastu skúlunum eru ávísar fortreytir loknar fyri at seta í verk matarskipan:
- Í Skúlanum á Fløtum er nýggjur framleiðslu/serverings køkur og matarstað til næmingarnar. (hvussu nógvar fleiri brúkarar kann køkurin framleiða til?)
- Í skúlanum við Løgmannbreyt eru hølir til serverings/(framleiðslu?)-køk og knappar 500 tkr. í tøkari játtan til køkin, umframt at pláss er til næmingar at eta í felagshølunum.
- Í Skúlanum á Argjahamri er skúlakøkurin innrættaður soleiðis, at matur kann veitast út í felagshøli til næmingar, men talan er ikki um ein framleiðslukøk.
- Hinir eldru skúlarnir eru ikki innrættaðir til matarskipan, so har skal roknast við størri umvælingum og íløgum, um matur skal veitast á staðnum
- Um ein kommunal matarskipan skal framleiða og veita skúlamat á fólkaskúlaøkinum verður ein ávísur íløgutørvur: í framleiðslukøk, í veitingar køkar og í matarumstøður á skúlunum, verður tørvur á íløgu í flutninsgtól um matur skal flytast á ávísan hátt út á skúlarnar.

<u>Royndarverkætlan við matarskipan.</u>
Fyri at fáa gongd á málið við matarskipan kann vera vert at seta í verk eina royndarskipan, við einum framleiðslukøki, til eitt hóskandi næmingagrundarlag í tveimum skúlum.

Sum partur av eini royndarverkætlan er vert at umhugsa at gera hóskandi meting av núverandi støðu á økinum, sum verður uppfylgd av eftirmetingum av royndarverkætlanini og eftirfylgjandi støðuni.

Matarskipan á dagstovnøkinum:
Í tann mun Børn og Ung og Mentanarnevndin eisini virka fyri at seta í verk matarskipan á dagstovnaøkinum er upplagt at samskift og samstarvað verður millum økini um, hvussu matarskipan verður sett í verk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at málið um matarskipan á skúlaøkinum verður viðgjørt av trivnaðarnevndini.

**Trivnaðarnevndin 16. januar 2025:** Samtykt at umsitingin kemur við einum uppskoti til ein arbeiðsbólk at skipa matarskipan í fólkaskúlanum.

**Ískoyti:**
Umráðandi er at fáa sett arbeiðsbólkin og fara til verka. Hetta er tó í ein ávísan mun trupult, tí setanin av limum í arbeiðsbólkin er tengd at hvørjir skúlar verða partur av royndarverkætlanini.

Mentamáladeildin gongur út frá at maturin verður veitt frá framleiðslukøkinum á Skúlanum á Fløtum og at matur fer at verða veittur til allar næmingar á skúlanum ella til eina ávísa deild. Tað er tí náttúrligt at skúlastjórin ella annað umboð fyri leiðsluna á Skúlanum á Fløtum verður umboða í arbeiðsbólkinum.

Mett verður eisini at royndarskipanin skal umfata veiting av mati til ein ella tveir aðrar skúlar í kommununi og at viðkomandi skúlaleiðslur skulu umboðast í arbeiðsbólkinum.
Mentamáldeildin hevur í hesum høpi í fyrsta lagið umhugsa Kollafjarðar Skúla og í øðrum lagið Eysturskúlan.

Um royndarskipanin fer at umfata børn í forskúla á viðkomandi skúlum eigur at verða umhugsa at seta avvarandi bólkaleiðari hjá Barna og Ungdómsdeildini at verða í bólkinum.

Umráðandi er at seta fólk við kostfakligari vitan í bólkin og hevur mentamáladeildin spurt seg fyri hjá Heilsu og Umsorganardeildini um møguleikan at at seta starvsfólk úr teirra økið í arbeiðsbólkin. Stjórin er jaliga sinna og vendir aftur við uppskoti um hvør kann luttaka í arbeiðsbólkinum.

Mentamáladeildin skal verða umboða í arbeiðsbólkinum.

Harumframt verður mælt til at umhugsa at seta eitt umboð fyri trivnaðarnevndina í arbeiðsbólkin fyri at tryggja tað politiska kjølfesti.

Umhugsa verður at arbeiðsbólkurin verður mannaður og fer til verka í takt við at avgerð verður tikin um hvørjar skúlar royndarverkætlanin umfatar.

Fyrsta uppgávan hjá arbeiðsbólkinum kann um so verður fyrst avklára hvussu nógvar máltíðir framleiðslukøkurin á Skúlanum á Fløtum kann veita og m.a. út frá hesi fortreyt gera uppskot um hvørjar skúlar og næmingabólkar royndarskipanin kann umfata.

**Tilmæli:**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>22. mai 2025 | Blað nr.: 327<br><br>Forkvinnunnar merki: |

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja at seta umboð fyri Trivnaðarnevndina, Mentamáladeildina, kostfakligt umboð fyri Heilsu og umsorganardeildina, umboð fyri leiðsluna á Skúlanum á Fløtum, umboð fyri skúlaleiðsluna í Kollafjarðar skúla og umboð fyri skúlaleiðsluna á  Eysturskúlanum í arbeiðsbólk at skipa royndarverkætlan fyri matarskipan til fólkaskúlan.

**Trivnaðarnevndin 13. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Annita á Fríðriksmørk umboðar trivnaðarnevndina.

**Ískoyti:** Arbeiðsbólkurin hevur havt tveir fundir og hevur viðgjørt fylgjandi evni ið verða løgd fyri Trivnaðarnevndina til viðgerðar.

- Avmarking av royndarverkætlanini
- Uppskot um tíðarætlan og ætlan fyri politiska viðgerð og støðutakan
- Uppskot um kostnaðarkrevjandi átøk hjá arbeiðsbólkinum og fígging
- Dømi um kostnað av royndarverkætlan og  kostnað av matarskipan til alt fólkaskúlaøkið.

## Avmarking av royndarverkætlanini

Matframleiðslan verður í framleiðslukøkinum á Skúlanum á Fløtum sum er bygdur til at kunna veita mat til Skúlan á Fløtum, tvs til 700-800 næmingar. Meira konkret so verður mett at køkurin megnar  at framleiða 450 døgverðar dagliga, umframt  meira av øðrum kaldum verðum.

Skúlamatur á 3 skúlum til umleið 479 næmingar
- Grunddeildin  í Eysturskúlanum 1. – 3. flokkur, 118 næmingar
- Miðdeildin  í Skúlanum á fløtum 4-6 flokkur, 233 næmingar
- Kollafjarðar skúli: 1. -9. Flokkur 128 næmingar

Við hesum fáa vit roynt framleiðsluorkuna hjá køkinum og benleiðis matveiting frá køkinum,  umframt at vit fáa royndir við matveiting út frá køkinum og boreiðing úti á einum býarskúla og einum bygdaskúla. Vit fáa eisini royndir við matarskipan til eina grunddeild og eina miðdeild í býarskúlum og til allar deildir í einum bygdaskúla.

## Uppskot um tíðarætlan og ætlan fyri politiska viðgerð og støðutakan

<table>
<tr><td colspan="12">2025</td></tr>
<tr><td colspan="6">2. skúlahálvár 2024/25</td><td colspan="6">1. skúlahálvár 2025/26</td></tr>
<tr><td>jan</td><td>feb</td><td>mars</td><td>apr</td><td>mai</td><td>jun</td><td>jul</td><td>aug</td><td>sept</td><td>okt</td><td>nov</td><td>dec</td></tr>
<tr><td></td><td></td><td colspan="8">Arbeiðsbólkur: Álit um royndarverkætlan</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td colspan="2">Nevndar og býráðsviðgerð</td><td></td></tr>
<tr><td colspan="12">2026</td></tr>
<tr><td colspan="6">2. skúlahálvár 2025/26</td><td colspan="6">1. skúlahálvár 2026/27</td></tr>
<tr><td colspan="7">2. skúláhálvár 2025/26</td><td colspan="5">1. skúlahálvár 2026/27</td></tr>
<tr><td>jan</td><td>feb</td><td>mars</td><td>apr</td><td>mai</td><td>jun</td><td>jul</td><td>aug</td><td>sept</td><td>okt</td><td>nov</td><td>dec</td></tr>
<tr><td colspan="7">Royndarverkætlan byrjar stigvíst</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td colspan="5">Royndarverkætlan komin væl í gongd</td></tr>
<tr><td colspan="12">2027</td></tr>
<tr><td colspan="6">2. skúlahálvár 2026/27</td><td colspan="6">1. skúlahálvár 2027/28</td></tr>
<tr><td>jan</td><td>feb</td><td>mars</td><td>apr</td><td>mai</td><td>jun</td><td>jul</td><td>aug</td><td>sept</td><td>okt</td><td>nov</td><td>dec</td></tr>
<tr><td colspan="7">Royndarverkætlan fult virkin</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td colspan="5">Royndarverkætlan heldur áfram</td></tr>
<tr><td></td><td></td><td></td><td></td><td colspan="6">Eftirmeting og uppskot til matartskipan</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td><td colspan="2">Nevndar og býráðsviðgerð</td><td></td></tr>
<tr><td colspan="12">2028</td></tr>
<tr><td colspan="6">2. skúlahálvár 2027/28</td><td colspan="6">1. skúlahálvár 2028/29</td></tr>
<tr><td>jan</td><td>feb</td><td>mars</td><td>apr</td><td>mai</td><td>jun</td><td>jul</td><td>aug</td><td>sept</td><td>okt</td><td>nov</td><td>dec</td></tr>
<tr><td colspan="12">Um samtykt Matarskipan stivíst  íverksetast i restina av skúlaøkinum.</td></tr>
</table>

## Uppskot um fígging av arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum

Mett verður at kostnaðurin av arbeiðinum í arbeiðsbólkinum verður uml. 200 tkr.

Samsýning til tveir limir í arbeiðsbólkinum og evt. keyp av servitan umleið 60 tkr.
Kunningarferð Reykjavík umleið 110 tkr.
Tørvskanning foreldur/næmingar umleið 30 tkr.

Samsýningar: mælt verður til at tveir limir í arbeiðsbolkinum fáa fundarsamsýning. Tann eini limurin er starvsfólk hjá Heilsu og umsorganardeildini, við royndum og útbúgving innan matvísind og framleiðslu, sum skal keypa sær fríð fyri at luttaka í bólkinum og skal avloysast á starvsstaðnum. Hin limurin er forkvinnan í trivnaðarnevndini, sum umboðar nevndina í bólkinum. Her verður mett at arbeiðið verður mett at fundarvirksemi verður so umfatandi at tað er rímuligt við fundarsamsýning. Harumframt skal roknast við at neyðugt verður innheinta meira servitan innan køksyrkið og matveitan í leypi av arbeiðinum hjá bólkinum.

Kunningarferð: Tað er sera umráðandi at fáa nærri innlit í royndir við virkandi matarskipanum so bólkurin rakar so rætt sum gjørligt við hesi royndarverkætlan.
Á skúlaøkinum í Føroyum er eingin fult virkin matarskipan ið bólkurin kann læra av. Matarskipan er byrja á Skúlanum á Skúlatrøð og hana kunnar bólkurin seg væl um, men hon fevnir bert um eitt ábit um morgunin og ikki um ein framleiðslukøk við veiting til aðrar skúlar. Í Íslandi hava kommunurnar í fleiri ár havt matarskipanir á skúlaøkinum so tað er upplagt at kunna seg um teirra royndir í útvaldum matarskipanum á teirra skúlaøkið.

Tørvskanning: Ætlanin er at gera eina einfalda spurnarkanning millum foreldur/næmingar í royndarøkinum, har kanna verður hvør tørvurin er á og hvør áhugin er í matarskipan. Sambært spyr.fo er kostnaðurin av eini slíkari kanning uml. 30.000 kr.

Fígging: Á staðnummar 4140 Ætlanir á skúlaøkinum er fígging tøk til endamálið.

**Møguligur kostnaður av royndarverkætlan og matarskipan á øllum fólkaskúlaøkinum.**

Lat tað verða greitt at baði ein royndarverkætlan og ein rættulig matarskipan vera kostnaðarmiklar fyriskipanir, baði í rakstri og íløgum. Tí verður sett upp eitt dømi um ein møguligan kostnað, soleiðis at viðgerðin og avgerðin um at gera uppskot um Royndarverkætlan, er grunda á eina verðuleikakenda ætlan um at fíggja virksemi tá avgerð skal takast.

Fyrivarni verður tikið fyri at hetta er ein meting og at arbeiði hjá bólkinum er komi sera stutt á hesum økinum.

Sum dømi fer matarskipan á skúlaøkinum við 3.100 børnum og einum miðalkostnaði pr. dag á 50 kr. at geva ein samlaðan rakstrarkostnað á 31 mió. kr. Eitt foreldragjald á 500 kr./mðr. yvir 10 mðr. gevur eina inntøku á uml. 15.5 mió. kr., um øll væl at merkja ynskja tænastuna. Eftir einum slíkum leisti verður árligi rakstrarkostnaðurin fyri kommununa sostatt umleið 15.5 mió. kr.

Brúkaragjald og avsláttarskipan kemur at hava beinleiðis ávirkan á kostnaði fyri kommununa og óbeinleiðis fyri hvussu nógv fara at brúka matarskipanina. Eisini av hesi grund er stór óvissa um kostnaðin fyri kommununa.

Fyri eina royndarverkætlan við 500 brúkarum verður metti samlaði kostnaðurin 5 mió.kr. og eitt møguligt brúkaragjald 2.5 mió.kr. Tað vil siga eina kommunal útreiðslu á 2.5 mió kr. Tó skal roknast við ein hægri kostnaði í royndartíðini, tí tað tekur tíð at seta framleiðsluna í verk og fáa fult virksemi.

Kommuna er so heppin at vit hava ein væl útgjørdan framleiðslukøk, men hóast tað so skal nakað av íløgu í á fáa hann fult útgjørdan, umframt at roknast skal við íløgum í køks og borðeiðingarviðurskiftum í

móttøkuskúlunum. Tað merkir at í mun til royndarverætlanin er ein stórur partur av íløguni longu gjørdur, men tað sama er ikki galdandi fyri eina matarskipan á øllum skúløkinum

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla Trivnaðarnevndini til at játta upp til 250 tkr av staðnummar 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til arbeiðið hjá Arbeiðsbólkinum fyri skipan av royndarverkætlan fyri matarskipan á skúlaøkinum í Tórshavnar kommunu og at málið verður beint í býráðið.

**Trivnaðarnevndin 08. mai 2025:** Ein meiriluti, Annita á Fríðriksmørk, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, taka undir við tilmælinum frá trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini við tí broytingin at minnilutin verður umboðaður í arbeiðsbólkinum.

Einmælt samtykt.

# 124/25 Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - bráðfeingis tørvur á hølum næstu tvey skúlaárin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.03.2025 | 36/25 | 25/03407-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.05.2025 | 66/25 | 25/03407-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 80/25 | 25/03407-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 89/25 | 25/03407-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 124/25 | 25/03407-1 |
| 6 Býráðsfundur | | | 25/03407-1 |

**Upprunin til málið**
Avgerð um at loyva trimum 1. flokkum í Sankta Frans fyri skúlaárið 2025/2026

**Lýsing av málinum**
Næmingar í 1. og 2. flokki í Sankta Frans skúla eru knýttir til frítíðarskúlan í Badmintonhøllini.

Talið av innskrivaðum børnum er umleið 100. Sum er tveir 1. flokkar og tveir 2. flokkar.

Mest loyvda barnatal í frítíðarskúlanum er ásett til umleið 60 børn.

Starvsfólk og leiðsla hava gjørt sera nógvar tillagingar og funnið loysnir, sum tó ikki eru optimalar við atlit til námsfrøði, starvsfólkaskipan ella fíggjarligt skynsemi, fyri at rúma øllum næmingunum úr Sankta Frans skúla.

Í 2020 setti kommunan tvær fyribils lonir á fríøkið útsynningsmegin frá Badmintonhøllini. Ein samanseting av staðseting og stødd av hølum gera, at lonirnar vera ikki brúkar av frítíðarskúlanum longur.
Ein lítil barnagarðsbólkur fyri børn, sum hava tørv á einum øðrvísi stovnstilboði, brúkar lonirnar.

Tá tríggir 1 flokkar byrja í august 2025 verður barnatalið umleið 114 børn. Tað er upp ímóti tvífalt so nógv børn, sum bygningurin er mettur til at rúma.
At tað verður ein eyka flokkur afturat ger, at er átrokandi neyðugt at byggja frítíðarskúlan út, og hølini skulu standa klár í august 2025.

Mælt verður til at byggja fyribils lonir til 44 børn.

<u>Tørvslýsing</u>
Lonirnar skulu hava:

- Klædnaklivar til børn og starvsfólk
- Ves til børn og starvsfólk
- Køkur
- Eitt stórt alrúm/felagsrúm, og
- Eitt hóskandi tal av smærri rúmum t.d. samrøðurúm, goymslurúm, starvsfólkarúm, spælirúm til villari spæl, spælirúm til stilt spæl, verkstaðsrúm.

<u>Staðseting</u>

Við atlit til byggingin skal ganga skjótt og so fíggjarliga skynsamt sum til ber, verður mælt til, at lonirnar vera staðsettar á parkeringsbásunum, sum liggja upp til spæliplássið framman fyri frítíðarskúlan.

Uppskot til staðsetingin skal takast við tí fyrivarni, at umsitingin hevur ikki kanna um byggiloyvi og fyribils nýtsluloyvi verður latið. Umsitingin hevur somuleiðis ikki spurt seg fyri, um vit fáa loyvi til at inndraga neyðugu parkeringsbásarnar.

Kostnaðarmeting
Ein varisliga kostnaðarmeting er viðfest í málinum. Metingin er gjørd við støði í tørvslýsingingini í málinum. Metingin skal takast við fyrivarni, tí umsitingin hevur ikki kannað faktisku viðurskiftini á staðnum.
Eindarprísurin tekur útgangsstøði í kostnaðinum fyri líknandi (nýggj) modul, sum vóru keypt og sett upp í Havnadali til Spíran.
Ein annar møguleiki er at bjóða uppgávuna út, har tilboðsveitarar sjálvir koma við uppskotið til slag og góðsku av modulum. Møguliga kunnu brúkt modul skaffast í Føroyum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Um fyribils lonirnar í ein útnyrðing úr Badmintonhøllini
Í 2020 vóru fyribils lonir settar upp á fríøkinum í ein útnyrðing úr Badmintonhøllini. Sambært byggiloyvinum, er talan um eitt fyribils loyvi sum er galdandi í 5 ár. Eftir 5 ár skal alt tað sum verður bygt takast burtur aftur, herundir eisini fundamentir, leiðingar o.a. og økið skal gerast sum tað var áðrenn. (sí mál nr. 20/03276-7)

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Bls. 19 í mannagongd um ásetan av barnatali í frítíðarskúlum í Tórshavnar kommunu (20/010095-2)
Byggiloyvi B2 (20/03276-7)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla til, at mentamálanevndin samtykkir:

- at fáa til vega útbjóðingartilfar
- at bjóða arbeiðið út í avmarkað útboð sum heildararbeiðstøka, og
- at úrslitið verður lagt aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 12. mars 2025:** Samtykt at seta nýggjar lonir upp og koma aftur í nevnd viðvíkjandi fígging.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur fingið til uppgávu at finna eina staðseting til fyribilsskúrarnar, sum eftir ætlan skulu byggjast áðrenn skúlabyrjan august 2025.

Bygningsdeildin hevur havt fund við Byggimálsdeildina um byggiloyvi og staðseting av lonunum. Byggimálsdeildin hevur framleitt viðheftu myndir, sí j. nr. 25/03407-8, Fyribilshølir til frítíðarskúlan við Badmintonhøllina – Flatmynd og j.nr. 25/03407-8, fyribilshølir til frítíðarskúlan við Badmintonhøllina – Støðumynd.

Í hesum uppskotinum verður víst á eina staðseting á parkeringsplássinum vestan fyri skýlið við Ovara vøll. Byggimálsdeildin vísir á, at tey vilja mæla frá, at staðseta lonirnar á hesum stað og harvið taka 14 parkeringspláss, sum annars eru við til at nøkta tørvin til virksemið í Gundadali. Byggimálsdeildin vísir á, at tað í dag mangla uml. 100 parkeringspláss í mun til, hvat kravið ásetur, og mæla tey til, at onnur staðseting verður funnin.

Býarskipanardeildin hevur síðani hugt upp á økið í síni heild, og vísandi til at tað ikki er nógv pláss eftir at byggja á í Gundadali, so er tað ikki heilt líkatil at finna eina góða staðseting í mun til verandi virksemi hjá frítíðarskúlanum.
Staðsetingarnar, sum kundu verið møguligar eru:

- Økið norðan fyri Gundadalshøllina, millum Dansifrøði og Gundadalshøllina. Hetta økið er møguligt at byggja á, men krevst nakað av jørðarbeiði, fyri at byggingin kann lata seg gera. Staðsetingin er tó nakað langt burtur frá verandi virksemi og spælimøguleikum við Batmintonhøllina. Tað kann eisini hugsast, at virksemið ikki sær hesa staðsetingina, sum ein møguleika í mun til at reka virksemið á frítíðarskúlanum.
- Økið millum HB-húsið og B36-húsið. Hetta økið er óbygt, og verður ikki brúkt til tað stóra virksemið í dag, og tískil er møguligt at seta nakrar lonir á økið. Mett verður, at frástøðan til verandi frítíðarskúla ei heldur eigur at vera ein trupulleiki, tá frástøðan ikki er meir enn tað sama. Hugsast kann eisini, at henda staðsetingin upp á sigt kundi rúma einum framtíðar frítíðarskúla og klubbvirksemi fyri ung.

Serliga grundað á, at fyrra staðsetingin við Gundadalshøllina er so langt burtur frá verandi virksemi, so verður mælt til, at staðseta lonirnar við Ovara vøll, millum HB- og B36-húsið.

Tað er við sera stuttum skotbrái, at henda staðsetingin skuldi finnast, so møguleikarnir at hoyra B&U, sum varðar av frítíðarskúlanum, og grannarnar báðar, fótbóltsfeløgini HB og B36, hava ikki verið til staðar.

Tað er sera týdningarmikið, tá talan er um fyribils lonir/skúrar, at tað tá verður "fyribils", og ikki nakrar lonir, sum enda við at gerast varandi loysn fyri virksemið. Kommunan eigur alt fyri eitt at arbeiða fram ímóti eini endaligari varandi loysn fyri frítíðarskúlan, soleiðis at virksemið fær nøktandi karmar at virka undir, og soleiðis at økið ikki kemur at framstanda við fyribils loysnum og bygningsformum, sum ikki taka hædd fyri verandi bygging í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta fyribils lonirnar/skúrarnar við Ovara vøll, í óbygda økið millum HB-húsið og B36-húsið, og at málið verður beint í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Samtykt, at staðsetingin verður sambært tekning *jnr. 25/03407-10 Støðumynd – Staðseting á økinum hjá frítíðarskúlanum*, og at beina málið í Mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt nr. 80/25 frá 5. mai 2025 í Byggi- og býarskipanarnevndini um staðseting til fyribils lonir.

Hetta mál snýr seg um at seta fyribils lonir upp við Badmintonhøllina, tí talan er um bráðfeingis tørv á hølum í samband við at ein eyka 1. flokkur verður tikin upp í Sankta Frans skúla eftir summarferiuna. Forskúlin í Sankta Frans heldur til í einari lon sum er staðsett í skúlagarðinum. Frítíðarskúlin deilir lonina við forskúlan. Hølisumstøðurnar í Sankta Frans eru ikki nøktandi, tí verður ikki mett, at tað ber til at staðseta ein frítíðarskúlaskúla í skúlanum. Tí verður mælt til at gera eina fyribils loysn við lonum við Badmintonhøllina, so børnini í 1. og 2. flokkum eru á sama matrikli.

Mentanmánanevndin hevur á fundi 12/3 samtykt at heita á Byggi- og býarskipanarnevndina í mál nr. 25/03406 um at finna eina varandi staðseting til ein nýggjar frítíðarskúla til næmingar í 0.-2. flokk í Sankta Frans skúla.

**Fígging**:
Kostnaðarmetingin fyri verkætlanina er 5,5 mió. kr.

Øll játtanin á fíggjarætlanini 2025 til at dagføra Hoyvíkar skúla verður ikki brúkt í ár. Umsiting mælir til at 5,5 mió. kr. verða fluttar av løgukonto 4175 LK41013 "Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring" og til eina nýggja løgukonto sum er til verkætlanina at seta fyribils lonir við Frítíðarskúlan í Badmintonhøllini.

Í komandi fíggjarætlan verður tí neyðugt at játta hesa upphædd til løgukonto 4175 fyri at verkætlanin at dagføra Hoyvíkar skúla kann halda fram ótarnað.

**Tíðarætlan**:
Umsitingin kunnar nevndina við eini tíðarætlan á næst komandi fundi.

Neyðugt verður leingja leigumálið við B36 til 1. og 2. flokk inntil fyribils lonirnar eru klárar at taka í nýtslu. Á §3 er játtað fígging til leigu av B36 húsinum fyri alt 2025, so neyðugt verður ikki við hægri játtan fyri restina av 2025, um partarnir leingja verandi leigusáttmála

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4175 | LK41013 | Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring | 3175 | | | Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini -bráðfeingis hølir | 5.5 mió |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla til:

- At 5,5 mió. kr. verða fluttar av løgukonto 4175 LK41013 "Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring" til eina nýggja løgukonto "Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - bráðfeingis hølir"
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.
- At nevndin gevur umsitingin heimild til at samráðast við B36 um at leingja leigusáttmálan inntil fyribils lonirnar eru klárar at taka í nýtslu.

**Mentamálanevndin 07. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Høgni Vilhelmsen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum frá mentamálanevndini og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti, vísandi til at peningurin verður tikin av játtanini til Hoyvíkar skúla.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, atkvøddu fyri at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøddi ímóti, og ongin atkvøddi blankt.

Málið var samtykt við 12 atvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari.

# 125/25 Miðbýarætlan - Havnará - 21/00407

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 72/25 | 25/01548-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 90/25 | 25/01548-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 125/25 | 25/01548-1 |

**Upprunin til málið**
Framhald av máli nr. 21/00407, sí undanfarnu málslýsing í mun til verkætlanartilgongd og fígging. Sí skjal nr. 21/00407-1, Miðbýarætlan – Havnará.

Sáttmáli varð í 2022 gjørdur við J&K Petersen og Føroya Grótvirki í sambandi við arbeiðið at gera eina á oman á verandi Havnará. Verkætlanin fevndi í fyrsta umfari um strekkið frá Betri Banki og oman til sunnara enda á Tinghúsvøllinum, har standmyndin av R.C. Effersøe stendur.
Arbeiðið er gjørt, seinastu ósemjurnar eru nú avgreiddar, og verkætlanin er liðug og skal lokast.

**Ískoyti**
Í tilgongdini gjørdist greitt, at nakrar meir- og minniveitingar fóru at verða í sambandi við verkætlanina. Hetta partvíst grundað á broytingar og onnur ynski til verkætlanina eins og ein avleiðing av útbjóðingarháttinum (tidligt udbud) eisini gjørdi seg galdandi. Harafturat varð byggitíðin sett at verða 8 mánaðir frá byrjan til avhendan, men byggitíðin dragnaði nakað, grundað á at arbeiðstakari varð tarnaður av veðri umframt at skundavgerðir vórðu tiknar fyri at náa tíðarfreistum, herímillum skering av flísum, uppstigan av uppbygnaði undir flísum og tekniskum leiðingum v.m. Verkætlanin varð avhendað byggiharranum í juli 2023.

Byggiharri ásannar, at verkætlanin grundað á útbjóðingarhátt og tíðarætlan, hevur lagt stórt trýst á partarnar, sum hava luttikið í verkætlanini. Tó kann ikki síggjast burtur frá, at partarnir hava inngingið avtalu um verkætlanina við sáttmálum, og hava verið avbjóðingar við endauppgerðum, nærri lýstar niðanfyri:

- Byggiharri metir ikki, at ráðgevandi arkitektur (Zeta Architects) hevur loyst sína uppgávu til fulnar, tá hugsað verður um tekningstilfar til øki 1 eins og endaligu loysnina viðvíkjandi handfaring av vatninum á bastión í øki 1. Partarnir eru ósamdir hesum viðvíkjandi, og hava samráðingarnar ikki funnið fram til eina semju.

- Fleiri avbjóðingar hava verið í sambandi við tekniskar leiðingar í økinum, sum hava havt við sær eyka arbeiði til tess at umskipa og fremja nøktandi loysnir av kaðalum hjá Løgtinginum, SEV, Føroya Tele (Net) og byggiharra í økinum. Ósemjur hava verið um, hvør átti at bera kostnaðin av arbeiðinum at umleggja gestakaðlar inni á kommunalari ogn. Kommunan hevur roynt at finna nøktandi semjur við ymisku partarnar, arbeiðini eru framd, og tískil hevur tað verið drúgt at finna fram til nøktandi semjur uttan at tær viðføra eitt hall.

- Grundað á broytingar í verkætlanini/tekningunum gjørdist grótframleiðslan/skering av flísum hjá Føroya Grótvirki ein meirveiting í sambandi við tilfar til verkætlanina. Broytingarnar kravdu munandi meira grót til at fáa somu nøgd av flísum eins og hetta gjørdist dýrari at framleiða, eisini grundað á vantandi tekningstilfar frá ráðgevandi arkitekti.

- Longda byggitíðin hevur somuleiðis havt eyka útreiðslur við sær í sambandi við ráðgeving/verkætlanarleiðslu.

Niðanfyri sæst eitt yvirlit yvir samlaða meirkostnaðin og endauppgerð av verkætlanini:

| | |
|---|---|
| Ósemja millum byggiharra og ráðgevandi arkitekt (Zeta) | kr. 47.812,50 |
| Ósemja um umlegging av kaðalum (SEV) | kr. 241.812 |
| Ósemja um umlegging av kaðalum (Føroya Tele) | kr. 174.376 |
| Eyka grótframleiðsla/skering av flísum (Føroya Grótvirki) | kr. 440.917,32 |
| Verkætlanarleiðsla byggiharraráðgevi | kr. 38.834,38 |
| Liðugtgerð (rudda øki) | kr. 2.059,80 |
| **Íalt geva hesar upphæddir** | **kr. 945.149** |

Endalig uppgerð er nú avgreidd við ymsu partarnar, og er arbeiðið við ánni so statt liðugt. Samlaða hallið á verkætlanini er áljóðandi kr. 945.812**.**

Upplýsast skal somuleiðis, at Løgtingið hevur goldið kr. 1.845.000, sum er teirra partur av verkætlanini.

**Skjøl**
J. nr. 21/00407-1, Miðbýarætlan – Havnará

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6275 | L62045 | Miðbýarætlan - Havnará | |

| **Upphædd** |
|---|
| 945.812 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at loka verkætlanina L62045, Miðbýarætlan - Havnará
- at fíggja meirnýtsluna á kr. 945.812 av karminum LK62999, Fríðkan av býnum og
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt.

# 126/25 Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.05.2025 | 35/25 | 25/00315-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 92/25 | 25/00315-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 126/25 | 25/00315-1 |

**Upprunin til málið**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Í samsvari við orðingar í samgonguskjalinum um at minka um CO2 útlát frá kommunalum bygningum, er málið ein liður í gongdini at knýta kommunalu bygningarnar í varandi orkukeldur.

Samstundis er hetta málið eisini ein liður hjá Tórshavnar kommunu at fylgja við allari tøkniligari framgongd og vera við í áhaldandi menningini innan aðrar orkukeldur.

Umsitingin ynskir heimild at gera útbjóðingartilfar og at bjóða út sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali, umframt at játta kr. 300.000 av løgukarminum LK61705 "Orkupolitikkur" til ráðgeving og útbjóðing.

Ein sólorkuskipan við mátti á 259 kW og við einari mettari árligari framleiðslu á 181.000 kWt verður fyri samlaðu verkætlanina mett at kosta umleið kr. 3,2 mió uttan mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>22. mai 2025 | Blað nr.: 338 |
| | Forkvinnunnar merki: |

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6177 | | Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali | ja |

| **Upphædd** |
|---|
| 300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til at taka undir við at flyta kr. 300.000 av løgukarminum LK61705 Orkupolitikkur undir kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, inn á nýggja verkætlan Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at umsitingin leggur málið fyri nevndina aftur til støðutakan, tá tilboðini koma inn.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at flyta kr. 300.000 av løgukarminum LK61705 Orkupolitikkur undir kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, inn á nýggja verkætlan Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali, og beina málið í býráðið.
Fíggjarnevndin viðmerkir, at talan bert er um heimild at gera útbjóðingartilfar v.m., og at innkomin tilboð verða løgd fyri viðkomandi nevndir til viðgerðar og støðutakan.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt.

# 127/25 Umsókn til ummælis um sundurbýti og samanlegging millum matr. nr. 139a og 1og, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 127/25 | 25/02603-1 |

**Upprunin til málið**
Eystaravág P/F søkir Búnaðarstovuna um keyp av lendi.

**Lýsing av málinum**
Økið, matr.nr. 1og, Hoyvík, verður í dag nýtt til útleigan av goymsluplássi til virkir og privat persónar. Umsøkjarin vísir á, at tað er blivið sera trongligt inni á ognini. Ánarin av matr.nr. 1og, Hoyvík, søkir Búnaðarstovuna um keyp av umleið 12.800 fermetrum av búnaðarjørð at leggja afturat matr.nr. 1og.

Víst verður til kortskjal »22/05169-5 Umsókn kortskjal matr.nr. 139a og 1og« og kortskjal »22/05169-7 Myndir«

Umsóknin um sølu av búnaðarlendi og umsókn um sundurbýti til samanlegging er send til ummælis hjá Tórshavnar kommunu.

Verandi ogn, matr.nr. 1og, Hoyvík, er umleið 11.500 fermetrar til støddar og er ein av størstu vinnustykkjunum á Hjalla. Bert stykkini, har Brennistøðin og Biogassverkið liggja, eru størri enn matr.nr. 1og, Hoyvík.

**Lógir, ásetingar o.a.**
*Almenna byggisamtykt*
Økið, søkt verður um, liggur partvís í umráðisparti B7 í 3. grundumráði og partvíst í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn.

Í umráðisparti B7 í 3. grundumráði er m.a. ásett:
- Loyvt er einans at byggja hús til stórt vinnuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.
- Bygging skal verða sett samsvarandi heildarætlan fyri alt økið ella hóskiligar partar av økinum.
- Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 13 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins.

Í 4. grundumráði er m.a. ásett:
- 4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
- Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traðar- og jarðarbrúk at gera.
- Hús og onnur bygging skulu vera soleiðis vorðin og sett soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tá vinnuútstykkingin á Hjalla varð planløgd, varð stórur dentur lagdur á at skipa grundøkini soleiðis í lendinum, at bygningarnir, og virksemið annars, fylgdi lendinum og í størstan mun ikki skuldu síggjast frá Kaldbaksvegnum. Við nøkrum fáum undantøkum er hetta eydnast sera væl, og vinnuøkið liggur væl fjalt, inntil koyrt verður inn í økið. Í sambandi við eitt annað líknandi mál viðvíkjandi matr.nr. 1og »J.nr. 18/01471«, varð ein lýsing av ognum og bygningum á Hjalla gjørd. Lýsingin vísti m.a. á, at bygningurin á matr.nr. 1og, Hoyvík er sera sjónligur frá Kaldbaksvegnum. Lýsingin varð gjørd út frá verandi grundstykkjum og bygningum.
Víst verður til myndaskjal »22/05169-6 Dømi um stykkið á Hjalla«.

Økið, ið søkt verður um, liggur í tveimum ymiskum grundumráðum, B7 í 3. Grundumráði og í 4. grundumráði. Sundurbýti av økinum er í stríð við § 17 í matrikullógini.
Áðrenn eitt sundurbýti til samanlegging kann fara fram, er neyðugt at broyta byggisamtyktina frá 4. grundumráði til B7 í 3. grundumráði.

Ein endurskoðan av almennu byggisamtyktini bíðar eftir endaligari góðkenning frá Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum (Umhvørvis- og innlendismálaráðnum), har byggisamtyktin á Hjalla er broytt, so hon fylgir matrikulmørkunum norðureftir. Víst verður til kortskjal »22/05169-12 Endurskoðan av almennu byggisamtyktini á Hjalla.pdf«
Broytingin er ein staðfesting av, at ynskiligt er at varðveita upprunaútstykkingarætlanina.

Dømi eru um, at kommunan hevur viðmælt sølu av uppískoytisstykkjum á Hjalla, tó við treytum sum byggilinjur, ið vóru lýstar á ognina.
Víst verður til mál »J.nr. 17/00907«, og mál »J.nr. 18/01471«. Í hesum málum varð søkt um keyp av ávikavist umleið 374 fermetrum og umleið 650 fermetrum at nýta til parkeringsøki.

Í verandi umsókn verður søkt um at leggja 12.800 fermetrar afturat verandi grundstykki, ið er umleið 11.500 fermetrar til støddar. Umsóknin verður mett sum útstykking av einum nýggjum grundstykki og ikki umsókn um uppískoytisstykki.

Í Kommunuætlanini frá 2020 vóru tveir møguleikar hjá Tórshavnar Kommunu at útvega nýggj vinnustykkir. Tann eini møguleikin var at troyta møguleikarnar fyri fleiri vinnustykkjum, har verandi vinnuøki eru, eitt nú á Hjalla. Hin møguleikin var at gera eina nýggja útstykking av vinnuøkjum, har eitt størri øki var sett av til vinnuligt virksemi.

Tórshavnar Býráð hevur samtykt at gera eina nýggja vinnuútstykking á Ovara Hjalla, og kommunan hevur keypt landsjørð frá Búnaðarstovuni til gerð av útstykkingini.

Búnaðarstovan hevur áður víst á, at Búnaðarstovan sum meginregla selur landsjørð til kommunur í sambandi við sethúsaútstykkingar, ídnaðarøkir v.m. Tá talan er um ískoytisstykkir og smærri matrikulerar rættingar, verður í ávísum førum selt beinleiðis til umsøkjaran, tó at kommunalt álagdar treytir verða lagdar við søluni.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/00907 Articon : Umsókn um loyvi at víðka parkeringsøkið á matr.nr. 1or á Hjalla og at ogna sær lendi í hesum sambandi
18/01471 Umsókn um keyp av uppískoytisstykki matr.nr. 3a til matr.nr. 1oe, Hoyvík
18/03051 Umsókn um broyting fyri part av byggisamtyktini fyri matr.nr. 3a, Hoyvík, frá 4. grundumráði til B7 í 3. grundumráði.
19/03960 Tillaga umsókn um broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki við matr.nr. 1oe og 139a, Hoyvík, frá 4. grundumráði til B7.
21/03070 Umsókn frá Búnaðarstovuni um sundurbýti av matr.nr. 3a, Hoyvík, til samanlegging av matr.nr. 1oe.
18/03588 Nýggj útstykking til vinnustykkir. Umhvørvisflokkur 3 til 7
22/01377 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Kortskjøl**
J.nr. 22/05169-5 Umsókn kortskjal matr.nr. 139a og 1og
J.nr. 22/05169-6 Dømi um stykkið á Hjalla
J.nr. 22/05169-7 Myndir
J.nr. 22/05169-12 Endurskoðan av almennu byggisamtyktini á Hjalla.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á byggimálsdeildini, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla frá at viðmæla sølu og frábýti av búnaðarjørð vísandi til at:

- Hetta kemur at verða sera sjónligt frá Kaldbaksvegnum og tí ikki í tráð við tey atlit, sum útstykkingarætlanin tekur hesum viðvíkjandi.
- Sundurbýtið kann verða í stríð við Matrikullógina, vísandi til broyttu byggisamtyktina.
- Nýtt vinnuøki er í gerð á Ovara Hjalla.
- Vikið verður frá meginregluni hjá Búnaðarstovuni um sølu av landsjørð

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023**: Samtykt at umsitingin ger eitt uppskot til, hvussu vinnuøki kann skipast, soleiðis at eitt øki omanfyri matr. nr. 139a fæst afturat til at bjóða út.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið á staðnum og mett um, hvussu nógv øki kann leggjast afturat matr. nr. 1og, út frá lendisviðurskiftinum, og hvussu tað kemur at síggja út á staðnum og frá Kaldbaksvegnum.
Umsitingin hevur gjørt 2 uppskot til hvussu matr. nr. 1og kann víðkast, annað við 1.859 m2 og hitt við 2.223 m2.

**Skjøl**
22/05169-23 Uppskot matr.nr. 139a

**Tilmæli**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til, hvussu økið kann skipast, sí skjal 22/05169-23 Uppskot matr.nr. 139a.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Kunnað varð um málið.

Súsanna Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Tann 11.09.2023 samtykti Innlendismálaráðið at góðkenna tær broytingar í almennu byggisamtyktini, sum býráðið hevur samtykt. Ein broyting er, at tað økið, sum her verður søkt um, nú liggur í 4. grundumráði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á byggimálsdeildini, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til, at umsøkjarin fær boð um, at byggisamtyktin er broytt, og at umsóknin tí ikki kann gangast á møti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at biðja umsøkjaran søkja av nýggjum.

Súsanna Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Nýggj umsókn er send kommununi um loyvi at víðka um grundøkið, matr. nr. 1og í Hoyvík við lendi, sum er keypt afturat frá Búnarðarstovuni. Søkt verður um at víðka ognina við einum øki áljóðandi 12.800m2, tí tað er blivið sera trongt inni á verandi ogn.
Umsøkjari hevur tørv á at kunna vaksa um karmarnar á verandi staðseting, og fevnir víðkanin um m.a. at vaksa um verandi høll við 720m2.
Tá vinnuútstykkingin á Hjalla á sinni varð skipað, varð stórur dentur lagdur á at skipa grundøkini eftir náturliga lendinum, soleiðis at grundøki, bygningar og virksemi lógu væl í lendinum og í stórst møguligan mun ikki skuldu síggjast frá Kaldbaksvegnum. Sumt virksemi er seinnu árini vorðið sjónligari í landslagnum, men er talan um smærri broytingar og víðkanir av verandi ognum í økinum. Hóast fáu undantøkini við smáum broytingum eru farin fram síðani útstykkingin varð skipað, so er heildin av útstykkingini framvegis varðveitt, t.v.s. skipan og markalinjur av grundøkjum í mun til natúrliga lendið, hamarin og gilini í landslagnum. Hóast broytingar eru farnar fram, so merkir ikki, at ynskt verður at skemma nátturuna og útsjóndina enn meiri, serliga við eyga fyri gillinum í økinum.

Víðkanin, ið søkt verður um, ger eitt sjónligt inntriv í gilið í landslagnum, umframt at talan ikki er um eina lítla broyting í støðd, tí søkt verður um at loyva eini meirnýtslu á eini ogn, ið fevnir um 12.800m2 afturat verandi ogn, sum er 11.539m2 til støddar.
Samanleggingin fer so statt at fevna um eitt grundøki áljóðandi 24.339m2. Einans tvey grundøki eru størri enn uppruna ognin hjá umsøkjara, men eru hesi uttast við innkoyringina til økið og innast í útstykkingini, og hava tískil ikki landslagið við hamarinum at fyrihalda seg til.

Um virksemið hjá umsøkjara ikki rúmast innan fyri verandi karmar, og neyðugt er at vaksa so nógv um grundøkið, so er spurningurin um virksemið eigur at vera í økinum.
Kommunan er í holt við at skipa nýggja vinnuútstykking oman fyri verandi útstykking, og er tí hugsandi, at umsøkjari kundi keypt annað grundøki til sítt virksemi.

Virksemið rúmast ikki innan fyri verandi økisásetingar í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og neyðugt er tí at gera eina broyting í byggisamtyktini fyri økið til at fevna um økisásetingina B7.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini tann 02.10.2023 varð ein eldri umsókn um keyp av lendi hjá Búnaðarstovuni viðgjørd. Nevndin samtykti at mæla frá at viðmæla sølu av parti av matr. nr. 139a, Hoyvík, sum eftir ætlan skuldi leggjast afturat matr. nr. 1og, Hoyvík, vísandi til at Innlendismálaráðið tann 11.09.2023, samtykti at góðkenna tær broytingar í almennu byggisamtyktini, sum býráðið hevði samtykt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at gera eina broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum kann loyva at víðka um virksemið í økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 25. november 2024:** Samtykt at ganga umsóknini á møti og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Búnaðarstovan hevur selt umsøkjaranum 12.800 m2 av matr. 139a Hoyvík at leggja saman við matr. 1og Hoyvík við tí treyt, at byggisamtyktin loyvir bygging.

Vísandi til løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m. §17, stk. 2 lýkur umsóknin ikki ásetingarnar fyri sundurbýti, tí tað krevur eina góðkenda byggisamtykt ella býarskipan uttan so, at avvarðandi myndugleiki hevur givið undantaksloyvi.
Sbrt. §20 í matrikuleringslógini skulu øll sundurbýtismál sendast viðkomandi kommunustýri til ummælis. Kommunustýrið skal greiniliga skila til, um nøkur regla í §17 er til hindurs fyri sundurbýtinum.

Í hesum føri lýkur umsóknin ikki ásetingarnar fyri sundurbýti, tí tað krevur eina góðkenda byggisamtykt ella býarskipan. Sundurbýtið kann ikki verða góðkent uttan so, at kommunan hevur givið undantaksloyvi. Í hesum føri er eingin góðkend byggisamtykt ella býarskipan fyri hetta økið.
Fram til 11. september 2023 var ein partur av økinum, sum talan er um, lagt saman við matr. 1og Hoyvík partur av øki B6. Eftir 2023 er alt økið 4. Grundumráðið og tí ikki byggiøki. Sostatt kann kommunan ikki viðmæla sundurbýtinum vísandi til omanfyri standandi.

Samtyktin 25. november 2024 í byggi- og býarskipanarnevndini um at ganga umsóknini á møti er somuleiðis í stríð við matrikuleringslógina.

Um býráðið ynskir at ganga umsóknini á møti, krevur hetta, at økið, sum søkt verður um at leggja saman við matr. 1og Hoyvík, verður lagt undir B6 í byggisamtyktini eins og restin av vinnuøkinum á Hjalla er.

Í hesum føri er at viðmerkja aftrat, at um umsøkjarin fær loyvi til at økja um víddina av matr. 1og við keypi av lendi uttanum kommununa, sleppur umsøkjarin undan at taka lut í felagsútreiðslum fyri samlaðu vinnuútstykkingina fyri umrødda lendið. Rætta mannagongd er at Búnaðarstovan seldi lendið til kommununa, sum síðani bjóðar lendið til keyps sambært góðkendari byggisamtykt.
Hesi eins og onnur viðkomandi viðurskifti skulu viðgerast ítøkiliga í samband við, at kommunan skal geva eitt undantaksloyvi.

Tí kann umsitingin í verandi løtu ikki mæla býráðnum til at taka undir við samtyktini hjá byggi- og býarskipanarnevndini frá 25. november 2024.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla býráðnum frá at ganga umsóknini á møti, tí at hetta er ikki í samsvar við matrikuleringslógina ei heldur mannagongdirnar við útboð av vinnuútstykkingum.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

# 128/25 Dagføring av serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 78/25 | 25/04664-4 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 128/25 | 25/04664-4 |

**Upprunin til málið**
Í 2021 varð samtykt at fara undir útstykking oman fyri Argjahamar, sí gamla málið, j.nr. *21/01777*, *Útstykking oman fyri Argjahamar,* og nýggja málið j. nr. *25/04323, Útstykking oman fyri Argjahamar – 21/01777.*
Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum fyri økið kunnu útstykkingar bert gerast sambært serstakari byggisamtykt. Serstøk byggisamtykt varð samtykt og hevur verið galdandi síðani september 2024. Sí j.nr. *25/04664-10, Galdandi serstaka byggisamtykt omanfyri Argjahamar.*

Ávegis verkætlanir í økisparti A (sethúsaøkið) og økisparti B (øki til almennan stovn) hava víst seg at krevja, at ávísar ásetingar at verða broyttar og/ella nágreinaðar. Sí j.nr. *25/04664-9, Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar – Við markeraðum rættingum.*

**Lýsing av málinum**
Galdandi serstaka byggisamtyktin er gjørd út frá eini heildarætlan, við rúm fyri umleið 190 bústøðum í sethúsum, raðhúsum og íbúðum. Endaliga talið av bústøðum er treytað av, hvussu økini í tilgongdini verða ment saman við keyparunum. Harumframt er eitt øki lagt av til bústovn/sambýli og eitt øki lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Ætlanin er býtt í 6 økispartar, har ymsar ásetingar eru galdandi, og leggur serstaka byggisamtyktin upp til, at heildarætlanir vera gjørdar fyri hvønn økispart sær.

Í samband við at heildarætlan fyri stovnin í øki B verður fyrireikað, verður mett hóskandi at økja um hæddarásetingarnar, soleiðis at mest loyvda hædd verður økt úr 10 m upp í 12,5 m. Somuleiðis verður mett ráðiligt, at strika áseting um mest loyvdu hæddir. Uppskotið um broyting er grundað á funktiónina á bygningum, ætlaður fólki við autismu. Bygningurin skal kunna veita friðaligar umstøður, og tað verður mett skynsamt at leggja tekniskar leiðingar (ventiliatión) høgt undir mønina. Sambært dagførdari heildarætlan fyri økið B, verður fasaduhæddin væl lægri enn 10 m, meðan mønuhæddin verður økt. Økta hæddarásetingin verður ikki mett at hava merkisverda ávirkan á ljósviðurskiftir í økinum.

Umsitingin metir eisini, at tað er hóskandi at nágreina ásetingar í øki A (sethúsaøkið), soleiðis at húsini fáa somu treytir sum sethúsaøkið í Klingurstjørn. Hetta verður gjørt við at loyva húsunum niðan fyri vegin at leggja 0,1 afturat byggistignum, sum kann nýtast til kjallara undir bilhúsi.

Ásetingar viðvíkjandi mest loyvdu hæddum verður eisini dagført, soleiðis at hesar samsvara við útstykking á Klingurstjørn.

Fyri at tryggja ein dám, sum ikki víkir frá Viðargøtu, Leitisgøtu og Rygsgøtu, har øll sethúsini eru bygd við longru útveggjasíðuni javnfjart við vegin, verður orðing løgd afturat, sum hevur til endamáls at tryggja ein framhaldandi dám í nýggju útstykkingini. Uppskot um tílíka orðing ljóðar soleiðis:

*Sethús skulu staðsetast soleiðis, at mønan og longra útvenda veggjasíðan stendur javnfjar við høvuðsvegin. Um sethúsini ikki hava mønu, skulu tey stillast, soleiðis at longra útvenda veggjasíðan er javnfjar við høvuðsvegin. Har høvuðsvegurin vendir, kunnu sethúsini staðsetast við skjøldri móti vegi, soleiðis at longra útvenda veggjasíðan fylgir lendishallinum. Sí skjal 2 fyri vegleiðandi skipan av øki A.*

At enda mælir umsitingin til at dagføra hesi skjøl:

- Skjal 2 (Økisuppdeiling) verður rættað, soleiðis at linjur í økisparti A vísa til viðmælta staðseting av sethúsum. Bygningslinjur í økisparti C, D, E og F verða strikaðar, av tí at nágreinilig heildarætlan enn ikki er tøk.
- Heildarætlan fyri økispart B (almennur stovnur) verður løgd afturat sum skjal 4.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:
- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk, og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri útstykking omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Kirkjubøur,* jnr: 22/07317
- *Útstykking oman fyri Argjahamar.* jnr: 21/01777

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Galdandi serstaka byggisamtykt omanfyri Argjahamar*, jnr. 25/04664-10
- *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar - Dagført uppskot*, jnr. 25/04664-10
- *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar – Við markeraðum rættingum*, jnr. 25/04664-9

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja dagføring av serstøku byggisamtykt oman fyri Argjahamar sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar - Dagført uppskot,* og beina málið í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Eftir kunningarfundin 12.05.2025 fyri grundstykkjaeigarar í útstykkingini oman fyri Argjahamar varð umsitingin gjørd varug við, at orðingar í ásetingini fyri øki A (Sethúsaøkið), kunnu misskiljast, og tí er neyðugt at rætta uppskotið, sum varð samtykt á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 5. mai 2025.

Talan er um áseting, sum hevur til endamáls at tryggja sethúsadámin í mun til Viðargøtu, Leitisgøtu og Rygsgøtu, og sum í uppskotinum verður orðað soleiðis, at longra útvenda veggjasíða er javnfjar vegnum. Henda orðing verður rættað (sí skjal Dagføring av serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir), soleiðis at ásetingin tryggjar, at takhallið á mønu fylgir vegnum og lendishallinum. Hetta verður mett at vera ein meira hóskandi áseting til tess at tryggja dámin.

Harafturat er orðing um sethús við sløttum taki tikin úr uppskotinum, og er endamálið við hesum somuleiðis at varðveita dámin. Ynskiligt er, at sethúsini sum minst verða bygd við slættari tekju, hetta tí at tað verður mett, at sethús við sløttum taki ikki hóska til brattlendið og verandi bygging norðan fyri nýggju útstykkingina.

**Nýggj skjøl**

- *Dagføring av serstøku byggisamtyktini omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir,* jnr. 25/04664-12

Omanfyrinevndu broytingar vórðu sendar við telduposti til limirnar í byggi- og býarskipanarnevndini, og hava allir limirnir svarað aftur við telduposti ella telefon, at tey taka undir við broytingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja dagføring av serstøku byggisamtykt oman fyri Argjahamar sambært skjalinum *jnr. 25/04664-12 Dagføring av serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256 Argir*.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Fyrst varð atkvøtt um eitt uppskot frá Kára Johansen um at beina málið aftur í nevnd.

Fyri at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson.

Ímóti at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen

Uppskotið um at beina málið aftur í nevnd varð felt við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og einari blankari.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið við teimum broytingum, sum vórðu gjørdar eftir kunningarfundin 12. mai 2025.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Ongin

Málið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

# 129/25 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1357b, 1356 og 1355, 1354a og 1354b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 76/25 | 25/02294-3 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 129/25 | 25/02294-3 |

**Upprunin til málið**
Endamálið við uppskotinum er at skapa umstøður til at økja um útboðið av fjølbroyttum íbúðum í Tórshavnar kommunu. Kommunuætlanini frá 2018 staðfestir, at tørvur er á at økja um lutfallið av íbúðum í mun til sethús.
Mál varð stovnað á heysti 2021, við tí endamáli at bjóða út at byggja lutaíbúðir og varð, umframt á Frúutrøð, víst á økið ovast á Villingadalsvegnum, matr. nr. 1356 og 1355 (sí mál nr 21/04713).

Býarskipanarliga er tað júst økið við Villingardalsvegin, sum hóskar seg sum næsta stóra menningarøkið, har byggjast kunnu bústaðir, umframt bygging til gerandishentleikar, so sum umstøður til handil, lækna, tannlækna o.a. Økið er í nærum beinleiðis sambandi við nýggja innkomuvegin, og tískil verður eisini mett ráðiligt at fara undir bygging í hesum økinum nú innkomuvegurin er um at vera liðugur.

Økið liggur niðan fyri hamaran, sum gongur sum ein rond framvið Villingardali, Undir Fjalli og Miðhorn. Býarskipanarliga verður mett hóskandi at partvíst nýta økið til lutfalsliga høga bygging (4-5 hæddir), tí útsýnið eystur og suðureftir verður ikki tikið frá verandi húsum. Harafturat skapar hamarin lívd frá vesturættini.

**Lýsing av málinum**
Í mál nr. 22/07300, *Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 við Villingardalsvegin, Tórshavn,* varð byggisamtyktin broytt frá A3 til A2 (høga bústaðarbygging), og varð hetta samtykt á býráðsfundi í mars 2023 og eftirfylgjandi góðkent av Umhvørvismálaráðnum.
Útstykking í A2, t.e. skipan av økinum, krevur serstaka byggisamtykt.

Umsitingin hevur verið í eini tilgongd at skipa økið saman við avvarðandi pørtum. Sambært galdandi almennu byggisamtyktini og innsendu uppskotunum, kann økið skipast við høgari bygging (í mesta lagið 5 hæddir) upp at hamrinum, og lægri raðhúsabygging (tvær hæddir) í og kring matr.nr. 1354a, sum er næstur atliggjandi sethúsunum. Týdningarmikið hevur verið, at økið verður skipað við fríøkjum og skynsomum vegasambandi, soleiðis at tað í stigum kann byggjast afturat, samstundis sum heildarætlan verður varðveitt.

Sí innsendu uppskotini:
- *25/02294-7 – Uppskot fyri matr. nr. 1354a og 1354b*
- 25/02294-6 – Uppskot fyri matr. nr. 1355 og 1356

Sambært innsendum uppskotum kunnu tað byggjast upp ímóti 500 íbúðareindir í økinum í umleið 30 bygningum. Til tess at seta hol á hesa verkætlan, og at tryggja at økið verður skipað sum ein heild, er neyðugt at gera serstaka byggisamtykt fyri økið. Økið er umleið 46.000 m$^2$ til støddar, og er hugsanin at serstaka byggisamtyktin kemur við árunum at fevna um alt økið eisini økið vestanfyri/niðanfyri Villingadalsvegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A2 og A3.

*Ásetingarnar fyri A2 eru:*

1. Umráðisparturin verður lagdur til hús í fleiri hæddum til bústaðabygging.
2. Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
3. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25.
4. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.
5. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn 5 hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
6. Hús skulu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m til mønuna.

*Ásetingarnar fyri A3 eru:*

1. Umráðisparturin verður lagdur til blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.
2. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
3. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
4. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús, 300 m2 fyri tvíhús og 250 $m^2$ fyri raðhús. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.
5. Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
6. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
7. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m2, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd.
8. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
9. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
10. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 m til hægsta punkt við útvegg.
11. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
12. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 4, 6, 7, 8, 9 og 10, og fyriskipað, at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Endaliga serstaka byggisamtyktin er ikki vorðin orðað enn, men er ætlanin at fáa hetta gjørt sum skjótast, soleiðis at uppskotið kann leggjast til almenna hoyring eftir politisku viðgerðina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir,* journal nr: 21/04713
- *Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175a, 1357b, 1356, 1355, 1354b, 1354a, 1353, 1352 við Villingardalsvegin, Tórshavn,* journal nr: 22/07300
- *Fyrispurningur um undantak at byggja íbúðir í tveimum hæddum á matr. nr. 1354a, Tórshavn,* journal nr: 25/04127

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í mál nr. 21/04713, Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir, varð samtykt at sølukostnaðurin fyri lendið skuldi ganga inn í kostnaðin av avleiddu verkætlanunum, so sum at gera vegin í fullgóðum standi, at knýta kloakk og aðrar leiðingar til økið.
Tekniska deild arbeiðir við hesum avleiddu verkætlanum, soleiðis at mennarar av økjunum kunnu knýta verkætlanirnar í kommunalu leiðingarnar, tá tað er komið hartil.

**Skjøl**

- *25/02294-7 – Uppskot fyri matr. nr. 1354a og 1354b*
- *25/02294-6 – Uppskot fyri matr. nr. 1355 og 1356*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við:
- at umsitingin fer undir at gera serstaka byggisamtykt fyri matr.nr 1356, 1355, 1354a, 1354b, 1357b, við Villingardalsvegin, Tórshavn, til bygging av íbúðum sambært viðheftu skjølum,
- at serstaka byggisamtyktin verður send til hoyringar, so skjótt hon er liðugt gjørd og samtykt
- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála tóku undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøddi ímóti.

Ein annar minniluti, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson, atkvøddi blankt.

Málið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og 4 blonkum atkvøðum.

# 130/25 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 139a, Hoyvík - Vinnuøkið á Ovara Hjalla,

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 28/25 | 25/00863-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 61/25 | 25/00863-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 75/25 | 25/00863-1 |
| 4 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 130/25 | 25/00863-1 |

**Upprunin til málið**
Arbeitt hevur í eina tíð verið við at skipa eina nýggja vinnuútstykking á Ovara Hjalla. Lendisarbeiðið er í gongd og serstøk byggisamtykt, sum lýsir eina skipan av økinum, kom í gildi í 2024 (sí skjal *Áteknað Serstøk byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla*). Sambært ætlanini eru vinnugrundstykkini rættiliga ymisk til støddar, og gevur hetta rúm fyri fjølbroyttum vinnuvirksemi.

**Lýsing av málinum**
Tá byggisamtyktin av fyrstan tíð var broytt, var prosjekteringin av vinnuútstykkingini ikki liðug, og tískil liggur økið partvíst sum B4 vinnuøki og 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Hetta málið snýr seg um at tillaga býarskipanina, soleiðis at B4 vinnuøkið fylgir markinum fyri serstøku byggisamtyktini fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla, og at broyta tann partin av økinum, har ætlanin er at at hava smærru vinnugrundstykkir til B7, sum er byggisamtyktaráseting, ið loyvir vinnugrundstykkjum millum 200-500m$^2$.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Ásetingar fyri B4 øki í almennu byggisamtyktini:**
1. Umráðisparturin verður lagdur til vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 2000 m$^2$.
4. Útstykking verur einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5.
6. Rúmmál á húsunum skal ikki fara upp um 3 m$^3$ fyri hvønn m$^2$ av grundstykkinum.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 12 m.

**Ásetingar fyri umráðispart B7 í almennu byggisamtyktini:**
1. Umráðisparturin verður lagdur til smærri vinnuvirki.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Grundstykkini skulu vera í minsa lagi 200 m $_2$ og í mesta lagi 500 m $_2$.
4. Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrliga avmarkað øki.
5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5.
6. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 1,0.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 9 m.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tá ið serstaka byggisamtyktin varð samtykt, var ætlanin at oyramerkja øki á tilsamans 9704m$^2$ til smærri vinnugrundstykkir, og er markið í serstøku byggisamtyktini (øki B) teknað hareftir. Síðani tá er ætlanin broytt, og viðmælir umsitingin at seta av umleið 14.556m$^2$ til B7 øki (smá vinnugrundstykkir). Á hesum økinum verður pláss fyri áleið 24 vinnugrundstykkir millum 200-500m$^{2,}$ sambært skipanaruppskotinum (sí skjal *Smærri vinnustykkir á ovara hjalla_skipanaruppskot_samlað*).

Um uppskotið verður góðkent, verður neyðugt at rætta markið í serstøku byggisamtyktini, soleiðis at tað fylgir B7 økinum, sambært skjalinum *Kort – Eftir broyting.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla, matr. nr. 139a, Hoyvík,* journal nr. 23/04694

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

-

**Skjøl**

- *Kort - Áðrenn broyting,* journal nr. 25/00863-2
- *Kort - Eftir broyting*, journal nr. 25/00863-2
- *Smærri vinnustykkir á ovara hjalla_skipanaruppskot_samlað, journal nr. 25/0863-3*
- *Áteknað Serstøk byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla, journal nr 23/04694*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 39a, sambært kortskjali *Kort-Eftir broyting,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Av tí at tað á býráðsfundi 27. februar 2025 varð samtykt at broyta almennu byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 39a á Hjalla, er neyðugt at broyta serstøku byggisamtyktina fyri økið tilsvarandi. Talan er um broyting av markinum og víðkan av øki B, ið er ætlað smærri vinnuvirkjum – grundstykki, ið skulu vera 200-500 $m^2$ til víddar. Á skjali *Samanbering* ber til at síggja, hvør broytingin er.

Somuleiðis verður ein tillaging gjørd fyri avlanga stykkið beint vestan fyri innkoyringina, av tí at skapið á tí í tilgongdini at gera útstykkingarætlanina er broytt.

Broytingarnar eru einans galdandi fyri kortskjalið á s. 4, sí skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Ovara Hjalla 15.04.25,* ið er uppskotið til broytingar, og skjal *Áteknað Serstøk byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla,* ið er serstaka byggisamtyktin áðrenn broyting.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Ovara Hjalla, skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Ovara Hjalla 15.04.25,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt.

# 131/25 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 58/25 | 25/00954-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 71/25 | 25/00954-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 93/25 | 25/00954-1 |
| 4 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 131/25 | 25/00954-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av mál nr 24/03527.
Í 2006 varð skráseting gjørd av bygningum, sum eru bygdir áðrenn 1958. Bygningarnir fingu ásett varðveitingarvirði, og arbeiðið er skjalfest í Tórshavnar Býaratlassi. Býaratlassið verður brúkt sum eitt vegleiðandi býarskipanarligt amboð, men virkar ikki sum ítøkilig heimild í viðgerðini av t.d. byggimálum, har ætlanin er at broyta bygningar móti tilmælunum í Býaratlassinum. Til tess at varðveita býarumhvørvið tørvar Tórshavnar kommunu amboð, ið kunnu nýtast til at verja serstøku byggilistina, býarskipanina og mentunarsøguligu virðini í kommununi, áðrenn ov seint er.

12. desembur 2022 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin, at umsitingin arbeiðir við at skráseta og raðfesta varðveitingarverd øki við at gera serstakar byggisamtyktir fyri hesi (sí mál nr. 22/06945). Í sama máli nevnir umsitingin fleiri økir í býnum, har varðveitandi byggisamtykt eigur at verða gjørd, av tí at hesi økini hava serstakt byggilistarligt, býarskipanarligt og søguligt virði. Ovarlaga á listanum er Rabarbukvarterið.

Tá ið matr.nr 828 varð keyptur í 2023, og nýggi eigarin hevði ynski um at sundurmatrikulera, soleiðis at umleið 315 $m^2$ stóri matrikulin á Tvørgøtu í framtíðini kundi rúma tveimum ognum, lat hetta seg ikki gera, tí galdandi byggisamtykt fyri økið, krevur grundstykkjavídd á minst 500 $m^2$ fyri stakhús (sí mál nr. 23/04734). Í býlinginum, sum upprunaliga varð útstykkjaður í 1920'unum, eru stórt sæð allar grundstykkjavíddirnar undir 500 $m^2$. Umsitingin metir, at galdandi ásetingar eru óhóskandi, og at varðveitandi byggisamtykt eigur at verða gjørd fyri Rabarbukvarterið. Í hesum sambandi bjóðaði eigarin av matr.nr 828 sær til at gera uppskot um eina varðveitandi serstaka byggisamtykt.

**Lýsing av málinum**
26. juni 2024 móttók umsitingin uppskotið til varðveitandi byggisamtykt, og hevur eftirfylgjandi tillagað tilfarið, við íblástri frá bæði útlendskum byggisamtyktum, serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og Reyn, og í góðum og tøttum samstarvi við Tjóðsavnið. Uppskotið, skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25,* hevur hesar týðandi broytingar við sær:

- Heimild verður fyri lutfalsliga smáum grundstykkjavíddum, og hóskandi ásetingar verða nágreinaðar fyri mest loyvdu hædd og byggi- og nýtslustig, við støði í siðbundnu húsunum í økinum.
- Krav verður um at varðveita garðar og byggilinjur, til tess at varðveita eyðkenda býarprofilin.
- Krøv verða sett til tilfarsnýtslu, snið og litir, sum samstundis tryggja, at húsaeigarar kunnu seta neyðugt viðlíkahald í verk og tillaga ognir til broyttar tørvir.
- Umsitingin mælir til stuðulsskipan, sum vit kenna frá Tinganesi og Reyni, har kommunan letur stuðul á 35% av upphæddini fyri siðbundið tilfar, sum serstaka byggisamtyktin krevur.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað Bústaðarbygging, har ásetingarnar eru:

## § 5. Ásetingar fyri umráðispart A1 í 3. grundumráði

1) Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur, og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2) Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3) Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.

4) Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrliga avmarkað øki.

5) Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.

6) Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri, og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi, soleiðis sum mynd 3 vísir.

7) Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

8) Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.

9) Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.

10) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

11) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt, at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$.

12) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 8 og 9.

Samsvar er ikki millum § 5, stk. 11 í galdandi almennu byggisamtyktini, ið ásetir at grundstykki ikki kunnu vera minni enn 400 $m^2$, og § 4, stk. 2 í uppskotinum til nýggja serstaka byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið, ið sigur, at grundstykki í økinum skulu vera millum 150 og 250 $m^2$ til víddar. Fyri at fremja rætta dámin í hesum, og í líknandi økjum, er tískil neyðugt at broyta § 5, stk. 11 í almennu byggisamtyktini, soleiðis at tað gerst gjørligt, at hava grundstykkir, ið eru minni 400 $m^2$. Tað hevur tó týdning at tryggja, at henda ásetingin einans kann nýtast í verandi økjum, har tað er neyðugt fyri at tryggja dámin í økinum.

Tískil verður mælt til, at nýtt stk. 12 verður sett inn í § 5 í almennu byggisamtyktina, ið er soljóðandi:

“Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað býarumhvørvi, verða loyvt at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 $m^2$, hetta fyri at varðveita dámin í økinum.”

**Upplýsingar frá umsitingini**

Umsitingin hevur afturvendandi mál, sum snúgva seg um, hvussu ávís økir í kommununi kunnu mennast uttan at missa søgulig og byggilistarlig virðir. Ætlanin við hesi byggisamtyktini er, at hon kann virka sum ein fyrimynd, tá líknandi byggisamtyktir skulu orðast aðrastaðni í býnum.

Av øðrum býarpørtum, har varðveitandi byggisamtykt kann verða gjørd, eru til dømis Jóannesar Paturssonargøta, Tinghúsvegurin, Tórsbyrgi, Tróndargøta/Bøgøta, Kilarakanalin, søguligir býlingar í bygdunum osfr.

Eitt annað skjal, ið er gjørt í sambandi við ynskið um at varðveita ávís býarøki í kommununi, er vegleiðingin “Heimbýlið títt”, sí skjal *Heimbýlið títt*. Hetta er ein vegleiðing til, hvussu farast skal fram, tá støða skal takast til umvælingar, umbyggingar og/ella nýbyggingar í økjum, ið eru varðveitingarverd. Í vegleiðingini er ein yvirskipað lýsing og frágreiðing um, hví vit varðveita, hvat vit skulu leggja til merkis, tá vit umvæla ella umbyggja og tílíkt. Harumframt verður komið nærri inn á ymisku húsasniðini í teimum ymisku varðveitingarverdu økjunum, og frágreiðing er um, hvat er serstakt við ymisku húsasniðunum. Í fyrsta umfari eru tey trý húsasniðini, sum í størstan mun myndað økið í Rabarbukvarterinum, traðarmannahús, skiparahús og stoypt hús, lýst, men ætlanin er, at vegleiðingin verður víðkað og húsasnið verða løgd afturat, so hvørt sum varðveitandi byggisamtyktir verða gjørdar fyri onnur varðveitingarverd øki í kommununi. Ynskið er, at vegleiðingin við tíðini fer at hava frágreiðing um øll tey ymisku húsasniðini, sum eru í kommununi.

Í serstøku byggisamtyktini fyri Rabarbukvarterið verður víst til vegleiðingina “Heimbýlið títt” og lýsingin av teimum viðkomandi húsasniðunum verður lagt sum fylgiskjal til serstøku byggisamtyktina. Vegleiðingin og lýsingin av teimum trimum húsasniðunum “traðarmannahús”, “skiparahús” og “stoypt hús” er ikki endaliga liðug, men verður klár áðrenn býráðsfundin 24. apríl 2025 og áðrenn uppskotið til serstaka byggisamtykt verður lagt til almenna og grannahoyring.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Varðveitingarverd øki og bygningar í kommununi,* journal nr. 22/06945.
- *Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 929. Tvørgøta 4. Tórshavntil ummælis,* Journal nr. 23/04734.
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvaterið,* journal nr. 24/03527

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Uppskotið til serstaka byggisamtykt verður sent eigarum av ognunum í økinum til hoyringar.

Vegleiðingin “Heimbýlið títt” er gjørd í samstarvi við Tjóðsavnið.

**Skjøl**

- *Kap. II, § 5 í almennu byggisamtyktini,* journal nr. 25/00954-2.
- *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25,* journal nr. 25/00954-4.
- *Heimbýlið títt,* journal nr. 25/00954-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Mælt verður til at stuðulsskipan, sum vit kenna frá Tinganesi og Reyni, har kommunan letur stuðul á 35% av upphæddini fyri siðbundið tilfar, sum serstaka byggisamtyktin krevur, somuleiðis verður gjørd fyri økið, sum serstaka byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið er galdandi fyri.

Ilt er at meta um, júst hvussu stórar fíggjarligar avleiðingar ein tílík skipan fer at hava, av tí at hetta velst um, nær – og hvussu stórar umvælingar eigarar av ognunum fara undir í framtíðini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið sambært skjalinum "*Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25*." Fylgiskjølini "Traðarmannahús", "Skiparahús" og "Stoypt hús" verða endaliga liðug áðrenn býráðsfundin.
- at samtykkja uppskotið til nýggja áseting í almennu byggisamtyktini, ið við serstakari byggisamtykt loyvir, at grundstykki kunnu vera minni enn 500 $m^2$, hetta fyri at varðveita ein ávísan dám, sí skjal *Kap. II, § 5 í almennu byggisamtyktini*.
- at líknandi stuðulsskipan, sum er galdandi fyri Tinganes og Reyn, eisini verður galdandi fyri økið, sum varðveitandi byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið fevnir um, soleiðis at kommunan fær heimild at lata eigarum stuðul, svarandi til 35 % av upphæddini fyri tilfarskostnað, ið lýkur treytir fyri nýggj krøv um siðbundið tilfar, og at *konta 6211 Aðrar útreiðslur*, í hesum sambandi verður tillagað, til at eisini at umfata Rabarbukvarterið umframt Tinganes og Reyn.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini við tí nágreining, at stuðul á 35% verður veittur fyri kostnaðarmunin ímillum siðbundið tilfar og tilfar, sum verður ynskt nýtt í Rabarbukvarterinum. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við at beina málið til hoyringar, men tekur ikki undir við at seta stuðulsskipanina í verk.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini við hesi broyting viðvíkjandi stuðulsskipanini:

*Stuðul á 35% verður veittur til kostnaðarmunin ímillum vanligt tilfar og tilfar, sum verður ynskt nýtt í Rabarbukvarterinum.*
*Stuðulin verður avtikin stigvíst yvir 15 ár soleiðis:*
*- 5 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 25%.*
*- 10 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 15%.*
*- 15 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin avtikin.*

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson

Ongin atkvøða var blonk.

Uppskotið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

| | Býráðsfundur<br>22. mai 2025 | Blað nr.: 358<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 132/25 Øking av vatngoymsluni í Villingadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.05.2025 | 23/25 | 25/04941-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 95/25 | 25/04941-4 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 132/25 | 25/04941-4 |

**Upprunin til málið**
Vandi er fyri, at um illa vil til við regndøgum, kann byrgingin í Villingadali gerast tóm. Hetta fær álvarsligar avleiðingar, tí tá fær stórur partur av Havnini einki vatn. Neyðugt er tí at kanna viðurskiftini kring vatnveitinga í Havn og meta um, í hvønn mun tað er neyðugt at gera tillagingar.

**Lýsing av málinum**
Í ár 2000 var byrgingin í Villingadali um at gerast tóm, hetta tí at turkur var í longri tíð.
Sannlíkindini fyri, at turkur sum tann í 2000 rakar aftur, eru rímiliga stór. Býurin er vaksin nógv síðani tá og væntast at vaksa uppaftur meira. Stórur partur av býnum fær einans vatn úr Villingadali.

Tí verður mælt til at kanna møguleikarnar fyri at økja um kapasitetin av byrgingini í Villingadali, so sleppast kann undan vatntroti.

Avleiðingarnar av eini tómari vatngoymslu í Villingadali eru sera álvarsamar. Trupulleikarnir fyri bæði húsarhald, vinnufyritøkur og almennar stovnar gerast ovurstórir. Tí er neyðugt taka málið upp sum skjótast.

Sí hjálagda frágreiðing frá Vatndeildini, ið lýsir málið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Jnr. 25/04941-2 Øking av vatngoymslu í Villingardali - SMJ
Jnr. 25/04941-3 Øking av vatngoymsluni í Villingadali frágreiðing Vatndeildin

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| | Býráðsfundur<br>22. mai 2025 | Blað nr.: 359<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | |
| 6775 | LK67005 | Vatnreinsiverk í Havnardali | 6775 | | Øking av vatngoymsluni í Villingadali | | 600.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Vatndeildini mæla til at:

- at heimilað verður umsitingini at heinta sær uttanhýsis ráðgeving viðvíkjandi kanningum av loysnum til at økja vatngoymsluna, herundir umhvørvisatlit, í Villingadali.
- at játtaðar vera kr. 600.000 til endamálið av konto 6775 Vatnveiting (íløgur), LK67005 Vatnreinsiverk í Havnardali til nýggja verkætlan: “Øking av vatngoymsluni í Villingardali” undir somu konto.
- at málið verður beint í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Høgni Vilhelmsen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, mælir til at peningurin heldur verður brúktur til at bora egna hol í undirgrundina soleiðis at meira vatn kemur í byrgingina, vísandi til at nógv vatn er í økinum.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini.

# 133/25 Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum - 22/03066

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 96/25 | 25/00319-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 133/25 | 25/00319-1 |

**Upprunin til málið**
Felags áhugamál millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið.

**Lýsing av málinum**
Síðani Skúlin á Fløtum flutti úr bygningunum á Frælsinum hevur samskifti við millumbilum verið millum Tórshavnar kommunu og Føroya landsstýri um, hvat bygningarnarnir á Frælsinum, ið eru samogn millum landið og kommununa, skulu brúkast til.

Partur av hesum samskifti hevur snúð seg um skúlabygningin í Hoydølum, ið somuleiðis stendur tómur.

Í eini roynd at finna eina loysn á fleiri avbjóðingum undir einum, eru Tórshavnar kommuna og Mentamálaráðið komin ásamt um at leggja fram eina makaskiftisloysn, ið loysir hølistrupulleikarnar hjá bæði landsmyndugleikunum og kommununi og letur upp fyri, at sjøtul kann setast á stóru campus-verkætlanina hjá Fróðskaparsetrinum á Frælsinum.

Fróðskapasetur Føroya heldur í dag til í fleiri bygningum, eitt nú í Sjóvinnuhúsinum hjá Tórshavnar kommunu. Ein ætlan um at savna Fróðskaparsetrið í einum campus-øki á Frælsinum hevur leingi verið í umbúna.

Samstundis hevur kommunalt politiskt ynski verið frammi um at savna alla fyrisitingina hjá Tórshavnar kommunu á einum stað.

Við at flyta Fróðskaparsetrið úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum og út í bygningarnar á Frælsinum og við at flyta fyrisitingina hjá kommununi úr mongu bygningunum í miðbýnum og út í Sjóvinnuhúsið, verða atlit tikin til ynskini hjá bæði Tórshavnar kommunu og Fróðskaparsetrinum.

Tórshavnar kommuna eigur 40% av bygninginum og økinum á Frælsinum, og landið eigur hini 60 %. Harumframt eigur Tórshavnar kommuna 100% av lon 4, ið er sambygd restina av bygningunum á Frælsinum.

Í eini avtalu, ið samstundis er ein makaskiftisavtala, er ætlanin at lata landinum ognarrættin á teimum 40% av samognini á Frælsinum umframt alla lon 4, móti at kommunan fær gamla studentaskúlabygningin í Hoydølum, og at kommunan samstundis gerst leys av einum gávulyfti, ið Tórshavnar býráð í 1990 gav Fróðskaparsetrinum um at lata lendi til víddar umleið 50.000 m² til nýtt Fróðskaparsetur í Marknagili.

Avtalan inniber somuleiðis, at Fróðskaparsetrið fer úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum skjótast gjørligt og í seinasta lagi við ársenda 2024.

Avtalan er somuleiðis treytað av, at Løgtingið góðkennir avtaluna millum partarnar, og at Løgtingið setir neyðuga peningin av til at umvæla bygningarnar á Frælsinum eftir eini nærri ásettari ætlan.

Tórshavnar kommuna treytar sær við makaskiftavtaluni, at bygningarnir á Frælsinum verða til almenn útbúgvingar- og granskingarendamál hjá Fróðskaparsetur Føroya, og/ella sum lestraríbúðir.

Føroya Landsstýri treytar sær við makaskiftisavtaluni, at ræðisavmarkandi byrður kunnu verða lýstar á ognina í Hoydølum, undir hesum, at ognin einans skal kunna nýtast til almannagagnligt virksemi hjá Tórshavnar kommunu og forboð móti sølu ella avhendan av ognini.

Við at taka undir við omanfyristandandi prinsippavtalu, taka býráðið ávikavist Føroya Landsstýrið undir við, at farið verður undir eina tilgongd at fremja ætlaðu felagsloysnina. Hetta inniber millum annað, at bygningarnir á Frælsinum og í Hoydølum og lendið, ið kommunan lat sum gávu í 1990 verður virðismett av óheftum ognarmeklara, so eitt makaskifti kann gerast, ið tekur hædd fyri virðunum, ið báðir partar lata og fáa við ætlaða makaskiftinum.

Farið verður eftir ætlan undir hetta arbeiðið beinanvegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003.

Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Principavtala dagførd 20. juni 2022 – Við dagføringum, j.nr. 22/03066-2
Skjal 3 - Leigusáttmálin SVH, j.nr. 22/03066-3
Skjal 2 - Býráðssamtykt 1990 o.a., j.nr. 22/03066-3
Skjal 4 - Kostnaður – Sjóvinnuhúsið, j.nr. 22/03066-3
Skjal 6 - Íløguætlanin, j.nr. 22/03066-3
Skjal 1 - Yvirlit yvir lendistørvi, j.nr. 22/03066-3
Skjal 5 - Servituttur á matr. nr. 18 Hoyvík, j.nr. 22/03066-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til prinsippavtalu millum Tórshavnar kommunu og Føroya landsstýrið og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:**

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:**
Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av samtyktini á býráðsfundi 22. juni 2022 hava Tórshavnar kommuna og Uttanríkis- og mentamálaráðið heitt á óheftan meklara um at meta um virðið á ognunum, ið ætlanin er at makaskifta.

Meklarafyritøka hevur mett virði á tí partinum av ognini á Venjingarskúlanum, ið er felags ogn til 79.700.000 kr.

Kommununnar patur, ið er 40% av ognini, er sostatt mettur til 31.908.000 kr.

Lon 4, ið stendur á matr. nr. 1031a, ið er ogn hjá Tórshavnar kommunu, er mett til 13.000.000 kr. Viðvíkjandi bygningunum hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum í Hoydølum er skúlabygningurin, ið stendur á matr. nr. 19, mettur til 32.500.000 kr.

Lonirnar, ið standa á matr. nr. 18 í Hoydølum, eru virðismettar til 4.500.000 kr. Talan er um lonir, ið kunnu takast sundur og flytast av økinum. Hesar hýsa í dag dagstovnavirksemi og eitt serskúlatilboð hjá Tórshavnar kommunu og hava tær tíðaravmarkað loyvi frá Yvirfriðingarnevndini at standa á lendinum í Hoydølum inntil ársskiftið 2023/24.

Í tilgongdini síðani prinsippavtalan millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið varð samtykt í býráðnum 22. juni 2022, eru partarnir vorðnir samdir um at avgreiða viðurskiftini sína millum sum avtalur um keyp og sølu heldur enn við makaskiftisavtalu.

Mett verður, at hesin leistur er minni drúgvur at koma á mál við enn leisturin við makaskifti. Hesin leistur krevur fyri kommununnar viðkomandi bert býráðsins góðkenning og skal ikki eins og ein makaskiftisavtala góðkennast av kommunala eftirlitinum hja Úmhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Partarnir hava tí endurskoðað prinsippavtaluna sína millum og verður hendan hervið løgd fyri býráðið til støðutakan.

Sambært endurskoðaðu prinsippavtaluni keypir Uttanríkis- og mentamálaráðið kommununnar lut av felagsognini á Frælsinum og lon 4, ið kommunan í dag eigur einsamøll.

Kommunan keypir gamla studentaskúlabygningin í Hoydølum, lonirnar, sum í dag hýsa dagstovnavirksemi og serskúlatilboði hjá Tórshavnar kommunu og undirlendið undir hesum bygningum, ið verður frábýtt til egið matrikulnummar og verður til víddar uml. 12.500 $m^2$.

Við avtaluni verður Fróðskaparsetrið uppsagt úr leigumáli sínum í Sjóvnnuhúsinum, og flytir Fróðskaparsetrið stigvíst úr bygninginum, til alt virksemið er flutt úr húsinum við árslok 2024. Fyri at siga sáttmálan upp í úrtíð verður rindað eitt endurgjald áljóðandi 4.200.000 kr. fyri part av teimum íløgum, Fróðskaparsetrið hevur gjørt í leigumálið í leigutíðarskeiðinum.

Eisini inniber avtalan partanna millum, at Tórshavnar kommuna tekur aftur og er leys av gávulyftinum, ið Tórshavnar býráð gav Fróðskaparsetrinum í 1990 um at lata lendi til víddar umleið 50.000 $m^2$ til nýtt Fróðskaparsetur í Marknagili.

At enda inniber prinsippavtalan, at Uttanríkis- og mentamálaráðið rindar Tórshavnar kommunu 1.854.000 kr. til tess at gera upp fyri munin millum virðið á omanfyri nevndu ognum á Frælsinum og í Hoydølum.

Fyriliggjandi prinsippavtala slóðar fyri, at Fróðskaparsetrið kann fara undir tilgongdina at umvæla, menna og flyta inn í eitt nýtt kampus á Frælsinum, og at Tórshavnar kommuna fær ræði á Sjóvinnuhúsinum og ognunum í Hoydølum til framtíðar kommunal endamál.

Fíggjarliga hevur prinsippavtalan ikki beinleiðis útreiðslur við sær fyri kommununa. Kommunan fær, tá ið øll viðurskifti sambært avtaluni eru komin upp á pláss, eina eingangsupphædd áljóðandi 1.854.000 kr. frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, og er hetta einasta ítøkiliga peningaflyting, sum avtalan hevur við sær.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og Trivnaðarstjórin mæla fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi, endurskoðaða uppskoti til prinsippavtalu millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samsvarandi býráðssamtyktina 29. september 2022 gjørdu Tórshavnar kommuna og táverandi Utttanríkis- og mentamálaráðið hin 3. november 2022 treytaða avtalu (nevnd "Treytað avtala millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið viðv. Kampusøki á Frælsinum í Tórshavn").

Sum liður í avtaluni bant landið seg m.a. til, at Fróðskaparsetrið skuldi flyta úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum í seinasta lagi við ársenda 2024. Hetta er enn ikki framt í verki.

Sum ein liður í avtaluni hevur landið goldið fyri at yvirtaka kommunurnar part av matr.nr. 1071d, Tórshavn, og matr.nr. 1031a, Tórshavn, sum kommunan átti 100%. Roknistykki sær soleiðis út:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. 1017d, Tórshavn. | kr. | 31.908.000,00 |
| Matr. nr. 1031a, Tórshavn. | kr. | 13.000.000,00 |
| = | kr. | 44.908.000,00 |
| *Mótrokning fyri íløgur í Sjóvinnuhúsið* | *kr.* | *-4.240.000,00* |
| **= Netto** | **kr.** | **40.668.000,00** |

Nettoupphæddin er komin á konto hjá kommununi 27. juni 2023, og ognirnar eru síðani tinglýstar við ognarheimild til Føroya Landsstýri. Tó er eisini framd ein mótrokning við støði í at Fróðskaparsetrið skuldi fara úr Sjóvinnuhúsinum sambært eini tíðarætlan, ið síðani ikki hevur víst seg at halda. Mett verður tí, at grundarlag er fyri at taka støddina av mótrokningini upp til nýggja viðgerð.

Formliga yvirtøkan og endaliga matrikuleringin av økinum í Hoydølum er ikki framd í verki. Sambært avtaluni skal kommunan yvirtaka ognirnar í Hoydølum fyri kr. 32.500.000 og lonirnar fyri kr. 4.500.000; tils. kr. 37.000.000. Partarnir undirritaður 25. mai 2023 eitt treytað skeytið hesum viðvíkjandi.

Tað hevur verið uppá tala at broyta byggisamtyktina fyri økið í Hoydølum, men hendan ætlan er seinni slept. Í løtuni hevur Tórshavnar kommuna ongar langtíðarætlanir við gamla studentaskúlanum ella við lonunum á verandi staðseting.

Í samskifti við landsstýrið er komið fram, at Almanna- og mentamálaráðið hevur áhuga í at nýta gamla studentaskúlan og aðrar bygningar, sum landið eigur í nærumhvørvinum, til at hýsa Tjóðsavninum. Landið ynskir tí at broyta avtaluna við kommununa soleiðis, at kommunan kortini ikki yvirtekur studentaskúlan.

Lonirnar standa á økinum við fyribils loyvi, ið gongur út í 2026. Tær skulu tí flytast av økinum. Trivnaðarstjórin metir, at lonirnar framvegis kunnu hava nýtsluvirði fyri kommununa, t.d. sum fyribils skúlastovur. Hetta er tó treytað av, at prísurin er hóskandi, at tær kunnu flytast uttan týðandi konstruktiónsskaðar, o.s.fr. Hesi viðurskifti mugu kannast nærri, áðrenn endalig støða verður tikin til, hvat gerast skal við lonirnar.

*Ognin, sum Tórshavnar kommuna sambært avtaluni skuldi yvirtaka: sí skjal 22/03066-3 skjal 1 – Yvirlit yvir lendistørvi*

*Kort yvir verandi matrikuleru viðurskifti í økinum: sí skjal nr. 25/00319-2*

Sambært § 5 í omanfyrinevndu avtalu frá 3. november 2022 kann verða kravt, at ognirnar skulu ganga aftur, um ávísar treytir í avtaluni ikki verða hildnar. Mett verður tó, at tað ikki neyðturviliga er til fyrimuns fyri nakran partin, um hetta verður kravt.

Áðrenn hetta kann verða kravt eiga partarnir tí at troyta teir møguleikar, ið eru fyri einari samlaðari loysn, sum tekur hædd fyri broyttu viðurskiftunum í málinum.

Greitt er ikki, nær landsstýrið fremur ætlanina um Tjóðsavn í Hoydølum. Politiskt ynski frá kommununi er at virka fyri betri arbeiðsumstøðum til skapandi listafólk, tá ið talan er um arbeiðshøli, høli til venjingar, framførslur og framsýningar, og í hesum sambandi at Studentaskúlin verður karmur um hetta fram til, at tjóðsavnslætlanin fer í gongd. Samráðing skal takast upp við landsstýrið um hetta. Almanna- og mentamálaráðið hevur frammanundan avtalu við LISA um nakað líknandi í øðrum bygningum í Hoydølum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til:

- at ynskið hjá landinum um ikki at avhenda ognirnar í Hoydølum við lendi o.a. verður gingið á møti,
- at avtalan millum kommununa og landsstýrið verður broytt soleiðis, at kommunan ikki keypir gamla studentaskúlan,
- at kommunan eftir nærri tørvsmeting og kanningar tekur upp samráðingar við landið um at yvirtaka lonirnar fyri í mesta lagi kr. 4.500.000, og at
- kommunan setir fram samráðingarkrav mótvegis landinum um at tillaga mótrokningina hjá landinum fyri íløgur í Sjóvinnuhúsið vísandi til, at landið ikki er farið úr hølunum til væntaða tíð, og
- at partarnir gera tíðaravmarkaða avtalu um at brúka Studentaskúlan til listaligt virksemi fram til, at tjóðsavnsætlanin verður framd.

Mælt verður til, at umsitingin innanfyri omanfyrinevndu karmar fær heimild at samráðast við landsstýrið og leggja úrslitið av hesum fyri fíggjarnevndina til endaliga góðkenning við teimum broytingum, ið ein endalig semja krevur.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum við teirri viðmerking, at kostnaðarviðurskifti viðvíkjandi keyp, flutningi, byggibúgving v.m. av lonunum verða greinaði nærri, áðrenn samráðingar við landið verða tiknar upp. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum, men mælir frá at kommunan yvirtekur lonirnar fyri upp til 4,5 mio. kr.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini við tí ískoyti, at úrslitið av einari endaligari semju kemur fyri bæði fíggjarnevndina og býráðið til góðkenningar.

# 134/25 Koyripeningur til býráðs- og nevndarlimir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 97/25 | 25/05413-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 134/25 | 25/05413-1 |

**Upprunin til málið**
Býráðspolitikarar búsitandi uttanfyri Havnina hava higartil ikki fingið koyripengar í sambandi fundir o.l., tí meginreglurnar hava verið grundaðar á tulkingum hjá TAKS, sum ásetur, at bara **løntakarar** hava rætt til koyripengar frá arbeiðsgevara í sambandi við nýtslu av egnum bili í arbeiðsørindum. Býráðspolitikarar fáa samsýning – og vera ikki tí roknaðir sum løntakarar – m.a. eftir Kunngerð um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við fyrispurning um koyripengar varð heitt á SPEKT um eina fakliga meting av hesum, og hava tey spurt TAKS, um býráðslimir hava rætt til koyripengar eftir §29, stk. 7, í skattalógini í sambandi við arbeiðið sum býráðslimur og nevndarlimur í kommunalum nevndum.

TAKS svaraði, at tey – vísandi til rundskriv nr. 1/1997 um skattliga viðgerð av endurgjøldum fyri ferðaútreiðslur v.m. hjá nevndarlimum o.ø. – høvdu endurmett sína støðu, at tey nú meta, at endurgjald kann veitast í hesum førum. Í rundskrivinum verður tó ikki nágreinað, hvørjar ferðaútreiðslur eru fevndar av rundskrivinum.

Í útgreinandi svari frá TAKS hava tey upplýst, at tey *”hava umrøtt hetta internt og halda at ásetingarnar í rundskrivinum kunnu brúkast til býráðslimir. Vit meta tó, at hetta skal avmarkast til regluligar fundir í býráðnum og regluligar fundir í teimum nevndum har býráðslimurin er partur av. Vit meta hinvegin ikki, at ásetingin kann brúkast til alt virksemi sum er tengt at, at verða limir í einum býráði.”*

Niðurstøðan er sostatt, at býráðs- og nevndarlimir **kunnu** fáa rætt til koyripengar eftir §29, stk. 7, í skattalógini í sambandi við arbeiðið sum býráðslimur og nevndarlimur í kommunalum nevndum, um býráðið samtykkir hetta.

Nevnast skal, at aðrar kommunur ikki veita politikarum koyripengar. Upp á fyrispurning kendu tey í Sunda og Runavíkar kommunum – ið eisini hava politikarar, ið skulu koyra yvir 15 km fyri at koma á fund – einki til nýggju tulkingina hjá TAKS.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 30. apríl 2025
- Hetta tí at munandi broytingar av skattalógini blivu framdar í 2023.

Kunngerð um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini (K.nr. 93 frá 9. sept. 2014).

TAKS: Rundskriv nr. 1/1997 Um skattliga viðgerð av endurgjøldum fyri ferðaútreiðslum v.m. hjá nevndarlimum o.ø.

Løgtingslóg nr. 144 frá 20. desember 2024 um broyting til ferðaútreiðslur

**Upplýsingar frá umsitingini**
Nú TAKS hevur broytt tulking av reglunum um koyripengar, verður mett, at býráðs- og nevndarlimir, kunnu fáa endurgjald fyri koyripengar eftir uppskotið til mannagongdir

viðvíkjandi koyripengum til býráðs- og nevndarlimir. Skjal nr. 25/05413-2

Býráðs- og nevndarlimir ið búgva í eini fjarstøðu á í minsta lagi 15 km frá Havnini, kunnu fáa endurgjald fyri flutning millum heim og fundarstað, tá møtt til regluligar fundir. Hetta er sama mark, sum er galdandi fyri at fáa ferðastuðul frá tí almenna, har fjarstøðan millum bústað og arbeiðsstað skal vera meira enn 30 km aftur og fram. Hettar verður galdandi fyri býráðslimir, sum ikki frammanundan fáa koyripengar frá tí almenna.

Bygdirnar í kommununi, ið hetta er galdandi fyri, eru samb. ásettu vegalongd hjá Landsverki: Norðadalur (15,58 km), Kirkjubøur (16,12 km), Kaldbak (18,45 km), Langasandur (19,95 km), Syðradalur (20,13 km), Oyrareingir (20,25 km), Við Sjógv, Kollafj. (22,91 km).

Koyripengar skulu latast eftir uppgerð so hvørt sambært mannagongdini "Koyripengar til býráðs- og nevndarlimir".

**Fíggjarligar avleiðingar**
Um býráðið samtykir mannagongdina um koyripengar til býráðs- og nevndarlimir, er metta árliga endurgjaldið fyri hvønn býráðslim búsitandi í minsta lagi 15 km frá Tórshavn, við verandi satsum soleiðis:

**Mettir koyripengar til býráðslim búsitandi uttanfyri Tórshavn/Argir/Hoyvík/Hvítanes/Velbastað**

| | **Km** | **Km t/r** | **Kr/km** | **Kr.** | **Fundir/ár*** | **Kr/ár** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðadalur | 15,58 | 31,16 | 3,20 | 99,71 | 52 | 5.185,02 |
| Kirkjubøur | 16,12 | 32,24 | 3,20 | 103,17 | 52 | 5.364,74 |
| Kaldbak | 18,45 | 36,90 | 3,20 | 118,08 | 52 | 6.140,16 |
| Langasandur | 19,95 | 39,90 | 3,20 | 127,68 | 52 | 6.639,36 |
| Syðradalur | 20,13 | 40,26 | 3,20 | 128,83 | 52 | 6.699,26 |
| Oyrareingir | 20,25 | 40,50 | 3,20 | 129,60 | 52 | 6.739,20 |
| Við Sjógv, Kol. | 22,91 | 45,82 | 3,20 | 146,62 | 52 | 7.624,45 |

**) Roknað er við 12 føstum fundum árliga (býráð og 3 fastar nevndir) umframt 4 fundir í eini staðbundnari nevnd*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/01007: Mannagongdir viðvíkjandi koyripengum til býráðs- og nevndarlimir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Koyripengar til býráðs- og nevndarlimir", dagf. 07.04.2025. skjal nr. 25/05413-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla fíggjarnevndini til at umrøða málið. Um mett verður, at býráðs- og nevndarlimir skulu fáa endurgjald fyri koyripengar, at taka undir við uppskotið til mannagongdir viðvíkjandi koyripengum til býráðs- og nevndarlimir og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við uppskotinum til mannagongdir viðvíkjandi koyripengum til býráðs- og nevndarlimir og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála, taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson, taka ikki undir við tilmælinum.

Ein annar minniluti, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen, atkvøddu blankt.

Samtykt við 8 atkvøðum fyri, 3 atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

# 135/25 Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum - 20/03903

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 65/25 | 25/00436-14 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 68/25 | 25/00436-14 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 135/25 | 25/00436-14 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl** 20/03903 Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund í februar til umrøðu og støðutakan.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Málslýsingin, fram til at byggiloyvi varð útskrivað, er í málinum j.nr. 20/03903, sum er hjálagt. Av tí at øll mál/skjøl skuldu lokast við árskiftið 2024/25, byrjar hendan málslýsingin við einum ískoyti, sum framhald av tí gomlu málslýsingini.

**Upprunin til málið**
BRIM arkitektar søktu tann 28. juni 2023 vegna kirkjuráðið fyri Arga Kirkju um loyvi til at byggja nýggja kirkju við Støðlagøtu, matr. nr. 115, á Argjum.

Málið fekk drúgva viðgerð og endaði við at býráðið tann 29. februar 2024 samtykti at geva treytað byggiloyvi.

Tann 29. februar 2024 bleiv treytað byggiloyvi útskrivað. Hetta byggiloyvið bleiv kært til Føroya kærustovn og Føroya kærustovnur kom til tað niðurstøðu, at ógilda byggiloyvið orsakað av, at Tórshavnar kommuna ikki hevði sent málið til parthoyring hjá nærmastu grannunum.

Víst verður til mál nr.: 20/03903 Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum (málslýsing hjáløgd)

**Lýsing av málinum**
Kommunan skal nú viðgera málið av nýggjum. Í hesum sambandi hevur kommunan sent parthoyringarskriv út til íalt 16 grannar, 13 av hesum hava svarað – ein granni tekur undir við at kirkjan skal byggjast og 12 grannar mótmæla bygging av kirkju við Støðlagøtu.

Viðmerkingarnar frá grannunum, sum heild, eru um somu evnir, hesi evnir kunna bólkast til at vera: náttúran, útsýni, parkering og staðseting.

**Náttúran**
Viðvíkjandi náttúruni, so hevur dentur verið lagdur á at sameina kirkjubygginga við ta náttúru, ið hon kemur at liggja í, og at nýtslan av økinum við Sandá sum fríøkið verður ávirkað í minst møguligan mun.
Kirkjan er staðsett uttan fyri friðingarlinjuna og Friðingarmyndugleikarnir hava góðkent ætlanina at leggja kirkju á økinum eftir Løgtingslóg nr. 48 um náttúrufriðing, § 2, stk. 2. nr. 3.
Nógv av plantuvøkstrinum er ikki náttúrligur vøkstur frá náttúruni á staðnum, men har aftur ímóti frá ymsum plantum frá urtagarðsruski, ið hevur plantað seg sjálvt við fríøkið fram við Sandá. At siga, at ætlaða byggingin av kirkjuni kemur at órógva órørdu náttúruna, er ivasamt.
Tá útstykkingin á “Müllerstrøð” bleiv gjørd, bleiv økið, har kirkjan skal standa, brúkt sum tyrvingarpláss fyri útgrevstrinum. Tað sæst týðiliga hvør partur á økinum hevur verið brúktur til tyrvingarpláss.

**Útsýni**
Hvat viðvíkir útsýni so er tað ein sannroynd, at tá bygt verður í einum øki, har bygt er frammanundan, so kemur nýggja byggingin ofta at ávirka útsýnið hjá grannunum á ein ella annan hátt. Tað er tó so, at um bygt verður eftir galdandi ásetingum, so hevur ein umsøkjari í útgangsstøðinum rætt til at fáa byggiloyvi. Útsýni er so statt ikki ein vardur rættur hjá grannum.

**Áseting um tal av parkeringsplássum:**
Í serstøku byggisamtyktini fyri øki til kirkju á Argjum eru ongar ásetingar um parkering, og tí skulu ásetingarnar í almennu byggisamtyktini og BK17 brúkast.

Í almennu byggisamtyktini eru heldur ongar ásetingar um tal av parkeringsplássum, av tí at ásetingar eru í BK17.

Í Bygningskunngerðini 2017 (BK17) er ásett í kap. 2.4.2 parkeringsøkir, at:

Stk. 1: Nóg nógv parkeringspláss skulu gerast, soleiðis at íbúgvar, starvsfólk, vitjandi, kundar, útvegarar o.o. kunnu parkera bilar, motorsúkklur, prutl, súkklur o.a. í økinum, sum hoyrir til byggingina.

Stk. 2: Víddin á parkeringsøkinum í mun til grundøkið, og nær tað skal gerast, verður ásett av kommunala byggimyndugleikanum og skal lýsast í byggiloyvinum.

Í høgru spaltu stendur: Sum vegleiðandi kann niðanfyri nevnda nýtast í metingini av, hvussu nógv parkeringspláss eiga at gerast (eitt yvirlit er yvir nøgd av parkeringsplássum í mun til slag av bygging).

Høvuðsregulin er sostatt, at nóg nógv parkeringspláss skulu gerast í mun til stødd og nýtslu av bygninginum.

Fyri kirkjuna á Argjum er tað soleiðis, at har arbeiða ikki nógv fólk, og tað er bara tá størri tiltøk eru, so sum kirkjugongd og jarðarferðir, at brúk er fyri nógvum parkeringsplássum. Tí ber til at hyggja eftir, hvussu nógv almenn parkeringspláss eru í umráðnum, sum kunnu brúkast, tá hesi tiltøk eru, og út frá tí áseta eitt passandi tal av parkeringsplássum við sjálva kirkjuna.

Útstykkingin "Müllerstrøð" hevur rættuliga nógv almenn parkeringspláss. Tættast við kirkjuna eru 20 pláss á ovaru síðu av Støðlagøtu, 15 pláss við gamla spinnaríið, 18 pláss í Garðsgøtu og 17 pláss í Heygstúni, tilsamans 70 pláss.

Byggimyndugleikin hevur, sambært BK17, kap. 2.4.2, mett um talið av parkeringsplássum. Umsøkjarin hevur teknað 24 parkeringspláss inni á stykkinum hjá kirkjuni, harav 3 eru til rørslutarnað. Byggimyndugleikin hevur mett, at hetta er eitt nøktandi tal av parkeringsplássum, tá atlit verða tikin til dagligu nýtsluna, og at tá størri tiltøk eru, kunnu tey almennu parkeringspláss í umráðnum brúkast.

**Staðseting:**
Serstaka byggisamtyktin fyri økið framvið Sandá varð broytt í 2011, og er tað henda byggisamtykt, sum loyvir bygging fram við ánni. Broytingin av byggisamtyktini fekk ta viðgerð, ið slíkar broytingar krevja, og Innlendismálaráðið góðkendi 8. november 2011 serstøku byggisamtyktina.

Í mun til staðsetingina gjørdi kommunan tá galdandi, at kommunan sum býarskipanarmyndugleiki metti, at talan er um eina góða staðseting, sum var gjølliga umhugsað, og mett varð ikki, at annað øki á Argjum er eins væl egnað og økið við Sandá.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Serstøk byggisamtykt fyri øki til kirkju á Argjum.
Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, umráðispartur D1 í 3. grundumráði.

**Upplýsingar frá umsitingini**
- Grundøkið, matr. nr.115, Argir, er 4110 $m^2$ til víddar.
- Bygging í D1-økinum er einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt.
- Friðingarmyndugleikarnir hava góðkent ætlanina at leggja kirkju á økinum eftir løgtingslóg nr. 48 um náttúrufriðing, § 2, stk. 2. nr. 3.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

Málið um byggiloyvi er j.nr. 20/03903 Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum.
Byggiloyvið er skjal nr. 52 og dagførdar tekningar sum byggiloyvi er givið til er skjal nr. 45.

**Skjøl**:
25/00436-11 Parthoyringsskriv, skipanaruppskot, serstøk byggisamtykt, kort sum vísir 16 grannar sum skulu parthoyrast og adressulisti.
25/00436-21 viðmerkingar frá grannanum Norðurstíggjur 2
25/00436-22 viðmerkingar frá grannanum Støðlagøta 2a
25/00436-24 viðmerkingar frá grannanum Spunagøta 1

25/00436-31 viðmerkingar frá advokati, vegna 8 grannar
25/00436-37 viðmerkingar frá grannanum Norðurstýggjur 6
25/00436-38 viðmerkingar frá grannanum Norðurstýggjur 6

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at staðfesta avgerðina um at skriva út byggiloyvi við tí treyt, at økið uttan um kirkjuna verður endurskapað, soleiðis sum tekningarnar, sum liggja við umsóknini um byggiloyvi, vísa, og annars við treytum, sum umsitingin setir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til endaliga avgerð.

Birgir Nielsen og Kári Johansen krevja málið fyri býráðið til endaliga atkvøðugreiðslu.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Kári Johansen bað um at beina málið aftur í nevnd. Atkvøtt varð um hetta.

Fyri at beina málið aftur í nevnd: Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson

Ímóti at beina málið aftur í nevnd: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála og Høgni Vilhelmsen.

Blankt atkvøddu: Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein

Uppskotið um at beina málið í nevnd fall.

Síðani varð atkvøtt um samtyktini frá Byggi- og býarskipanarnevndini um at skriva út byggiloyvi við tí treyt, at økið uttan um kirkjuna verður endurskapað, soleiðis sum tekningarnar, sum liggja við umsóknini um byggiloyvi, vísa, og annars við treytum, sum umsitingin setir:

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Tróndur Sigurðsson, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe og Kristianna Winther Poulsen.

Blankt: Kári Johansen.

Málið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

# 136/25 Umsókn um stuðul til ítrótt og frítíðarvirksemi, Andrass Thomsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.05.2025 | 72/25 | 25/04951-2 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 136/25 | 25/04951-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um stuðul til altjóða hondbóltskapping.

**Lýsing av málinum**
Hondbóltssamband Føroya (HSF), søkir um stuðul á 75.000 kr. til Nordic Open 2025, sum HSF fer at skipa fyri 6. – til 9. Juni 2025.

Kappingin í 2025 verður fyri U17-landslið við dreingjum og vónar HSF samstundis, at hetta verður eitt afturvendandi tiltak. Nakrar av sterkastu hondbóltstjóðunum hava játtað at luttaka í 2025: Føroyar, Sveis, Ísland og Týskland.
Kappingin verður skipað við trimum leikdøgum, har øll liðini spæla ein dyst ímóti hvørjum øðrum. Fyrsta leikdagin verður Runavík vertur fyri dystirnar, meðan dystirnir hinar báðar dagarnar verða spældir í høllini á Hálsi, ella Hoyvíkshøllini.

HSF vísir á, at hendan kappingin kann hava góðan ágóða fyri vinnulívið í TK.
Samanlagt koma áleið 100 leikarar og venjarar til Føroyar í samband við kappingina.
Hesi koma øll at gista í Tórshavn.

**Fígging**
HSF hevur fingið stuðul á 50.000 kr. frá Runavíkar kommunu, 71.330 kr. frá ÍSF og harumframt hevur HSF søkt um stuðul á 50.000 kr. frá Vestnordisk Hovedstadsfond. HSF metir, at tey fáa áleið 30.000 kr í inntøkum í atgongumerkjasølu.
Útreiðslurnar eru mettar at verða 278.900 kr. Her er gisting á 189.000 kr. tann største posturin.
Busskoyring á 25.000 kr. og matur á 25.000 kr. eru teir næststørstu postarnir.

Sbrt. mál 25/03710 samtykti Mentamálanevndin tann 2. Apríl 2025 ikki at játta stuðul til hesa kappingina.
Munurin er, at tá skuldi kappingin verða við Tjarnir, sum er ein sjálvsognarstovnur, og nú verður kappingin í teimum kommunalu høllunum í Havn.
Við útgangsstøði í hesum, metir umsitingin, at TK onkursvegna skal inn og taka eina yvirskipaða støðu til, hvussu gerast skal í framtíðini.
Umsitingin metir samstundis, at man má gera mun á at stuðla einum tiltaki og so einum rakstrarkostnaði, sum t.d. hallarleiga til venjing, skrivstovu- ella húsaleigu. Samstundis skal hædd takast fyri, um umsóknir eru í tráð við leistin innan vinnuferðavinnu.

Um vit samanbera við Tjarnir við aðrar líknandi sjálvsognarstovnar, so hevur TK ofta stuðla tiltøkum í t.d. Norðurlandahúsinum, Dansifrøði og Sjónleikarahúsinum.
Sum dømi hevur TK stuðla tiltøkum í Norðurlandahúsinum sum “International World Music days”, dansisýningina hjá RIVA “Kanska ein bygd” og onkrari altjóða kapping hjá bæði Havnar Dart og Bridgesambandinum.

Um TK velur, sum prinsipp, ikki at stuðla nakrari verkætlan við Tjarnir, hóast leigukostnaðurin møguliga er ein minni partur av samlaðu fíggjarætlanini, so er møguleikin til staðar, at tílíkar verkætlanir ikki kunnu útinnast í framtíðini við Tjarnir. Hetta kann víðari hava við sær, at við Tjarnir, sum var ein stór íløga hjá TK, ikki kann røkka sínum fulla potentiali.

Á hinari síðuni, so er við Tjarnir formelt ein sjálvsognarstovnur, og tað finst ongin samtykt ella reglugerð um, at TK hevur ábyrgd av hvat víðari hendir við Tjarnir.
Í júst hesum málinum, skal eisini havast í huga, at HSF hevur eina skuld til Ítróttaanlegg á góðar 390.000 kr. Skuldarspurningurin verður væntandi avgreiddur innan summarferiuna.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Leiðreglur samtyktar av Mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs 3. september 2015.
- Leiðregla um stuðul til fleirtjóða ítróttakappingar og -tiltøk í Tórshavnar kommunu, samtykt av mentamálanevnd Tórshavnar býráðs 6. juni 2018.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
**Mál 21/05194** HSF : Umsókn um stuðul til undankapping til HM2023 fyri
A landslið við monnum – (játtað 75.000 kr.)
**Mál 21/01679** Umsókn um stuðul til undankapping til EURO2022 fyri kvinnur, sum verður í Føroyum 4 (Játtað 75.000 kr.)
**FBF** Mál: 23/00275 Umsókn um stuðul til heimadystir hjá A landsliðunum hjá kvinnum
Og monnum í CEC Silver League frá 27. mai til 4. juni 2023 (játtað 75.000 kr.)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5365 | Stuðul til ítrótt | | | | | | 50.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |

| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
|---|---|---|
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta stuðul á 50.000 kr. av konto 5365 (stuðul til ítrótt).

Umsøkjarin kann fáa at vita, at stuðulin eisini kann nýtast um tiltakið verður við Tjarnir. Hetta er tó við teirri treyt, at umsøkjarin verður kunnaður um, at TK í næstum fer at melda greitt út, hvussu leisturin verður framyvir.

**Mentamálanevndin 07. mai 2025:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen og Birgir Nielsen, tekur undir við at stuðla tiltakinum við tí treyt at tiltakið verður í Tórshavnar kommunu.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við at stuðla sersambondum, tí tað gongur útyvir ungdómsarbeiði hjá ítróttarfeløgum í Tórshavnar kommunu og krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Elsa Berg, borgarstjóri, setti fram eitt broytingaruppskot, soleiðis at kr. 50.000 verða játtaðar í stuðli av *kontu 5365 stuðul til ítrótt* til tann partin av tiltakinum, sum gongur fyri seg í Tórshavnar kommunu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson.

Ímóti atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Uppskotið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

# 137/25 Dagføring av serstøku byggisamtyktini fyri Argjaboða, matr. nr. 43g og 43h, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 77/25 | 25/02905-4 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 137/25 | 25/02905-4 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna móttók 09.03.2022 umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr. nr 43h. Umsóknin lýsir bygning niðanfyri Argjaboðagøtu við 16 íbúðum, og samtykt var at viðmæla umsóknini. Økið liggur innan fyri C3- miðstaðarbygging í almennu byggisamtyktini, og er krav um, at serstøk byggisamtykt verður gjørt fyri økið.

Serstøk byggisamtykt hevur síðani 2021 verið galdandi fyri matr. nr 43h (sí skjalið *SB_Argir_Argjaboði_2018_3_2021)*, ið er omanfyri Argjaboðagøtu, har verkætlan við 30 íbúðum er farin í gongd.

Hetta málið snýr seg um at víðka økið, sum serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, soleiðis at økið eisini fevnir um matr. nr 43h, og ætlanina at byggja 16 íbúðir har (sí skjal, *20240124_Myndugleikaprosjekt.pdf)*.

**Lýsing av málinum**
Ítøkiliga snýr broytingin seg um at rætta markið (sí *Kort 1 - Áðrenn* og *Kort 1 - Eftir broyting*), og at dagføra fylgiskjal 2 og 3, soleiðis at verandi serstaka byggisamtyktin fyri Argjaboða eisini rúmar íbúðarverkætlanina fyri matr nr. 43h (sí *Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða - Við dagføringum.)*

Umsitingin ásannar, at tað eru býarskipanarligir vansar við at staðaseta íbúðabygging við endan á Argjaboðagøtu, og eru hesir, at vegurin er smalur og í ringum standi, umframt at núverandi busssamband ikki koyrir eftir vegnum. Hinvegin kann økta íbúðarútboðið á Argjaboða tálma bústaðarneyðini og fjøltátta bústaðarviftuna fyri niðara part av Argjum (gomlu bygdina), har stórt sæð øll grundstykkini eru løgd av til sethúsabygging. Somuleiðis er staðsetingin skynsom til tess at økja um íbúðartalið uttan at taka útsýnið frá verandi bygging og uttan at byggja á meira miðskeiðis staði í býnum, har kostnaðarstøði sannlíkt verður munandi hægri.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Økisásetingarnar eru:

*§ 17. Ásetingar fyri umráðispartin C3 í 3. grundumráði*
1. Umráðisparturin verður lagdur til miðstaðarbygging og íbúðir.
2. Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
3. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,4.
4. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur kannað søguligu gongdina fyri nær økið á Argjaboða varð broytt frá at vera vinnuøki til at gerast miðstaðarøki, sum loyvir íbúðarbygging. Vísandi til mál nr. *2003-1602, Meinhard Dam: Umsókn um broyting av ásetingunum av matr. nr. 43g, Argir – broyting av byggisamtykt á Argjaboða*, so er tað hendan umsóknin sum upprunaliga var við til at fremja broytingina í Almennu byggisamtyktini. Upprunaliga varð søkt um at broyta byggisamtyktina til A1 ella A3, og metti umsitingin, at rætta ásetingin fyri økið var A3, tá tað varð grundgivið við, at tað var tørvur á fleiri bústøðum í kommununi, umframt at tá Argja kommuna var løgd saman við Tórshavnar kommunu, so varð mett, at tað vóru aðrar betri egnaðar

staðsetingar til vinnuligt virksemi. Táverandi Innlendismálaráð metti ikki, at økið kundi broytast til bústaðarøki, tá tað lá so tætt uppat vinnuøkinum. Í 2008 varð økisásetingin fyri matr. nr. 43g broytt til C3, Miðstaðarbygging, sum loyvir íbúðarbygging, meðan restin av økinum framvegis lá sum vinnuøki. Seinni í 2008 varð restin av økinum á Argjaboða broytt til C3, Miðstaðarbygging.

Økið, sum uppskotið um serstaka byggisamtyktin fevnir um, verður økt til umleið 5630 $m^2$, og loyvir sambært verkætlanunum tilsamans 46 íbúðum við 54 p-plássum. Nýggja útboðið av íbúðum kann vera liður í at bøta um bústaðartørvin í Havnini. Staðsetingin er við endan á Argjaboðavegnum og er omanfyri 800 metrar burturi frá nærmastu bussleið. Tað er týdningarmikið, at nøktandi flytføri verður tryggjað eftir Argjaboðavegnum, soleiðis at tað er trygt at ganga, súkkla og koyra eftir vegnum.

Galdandi serstaka byggisamtykt varð góðkend av landsmyndugleikunum við treyt um, at strekkið fyribils verður regulerað við ljósregulering, áðrenn vegastrekkið verður breiðkað.
Tekniska deild upplýsir, at arbeitt verður við at gera ljósregulering fyri vegastrekkið Argjavegur til Argjaboðagøtu. Harumframt verður upplýst, at arbeitt verður við at nøkta atkomuna út á Argjaboða við at breiðka vegin, men verður vegastrekkið í fyrsta umfarið regulerað við ljósregulering.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Umsókn um prinsipployvi og møguligar viðmerkingar til byggiloyvi til íbúðarverkætlan á matr. nr. 43h, Argir*, journal nr. 22/01040
- *Nýggj serstøk byggisamtykt á Argjaboða, matr. nr. 43g, Argir,* journal nr 18/03069
- *Meinhard Dam : Umsókn um broyting av ásetingunum av matr nr. 43g, Argir - broyting av byggisamtykt á Argjaboða,* journal nr. 2003-1602

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í viðgerð av málinum um Umsókn um prinsipployvi og møguligar viðmerkingar til byggiloyvi til íbúðarverkætlan á Argjaboða (mál nr: 22/01040) vísa byggimálsdeildin og tekniska deild á, at:

- Uttasti parturin av Argjaboðagøtu er ikki nøktandi til so nógva bygging, sum ætlanin er at gera afturat. Vegurin er uml. 5 m breiður, har eru ongar gongubreytir, onki vendipláss og ongi almenn parkeringspláss.
- Kloakkir og aðrar leiðingar eru heldur ikki nøktandi.
- Roknast má tí við, at kommunan má gera eitt prosjekt fyri at dagføra vegin og leiðingar, og at hetta arbeiði má setast í verk innan ikki alt ov langa tíð.
- Eisini eigur kommunan at umrøða, um kommunala bussleiðin ikki eigur at koyra út til Argjaboða, nú ætlanin er at byggja so nógvar nýggjar íbúðir á staðnum.

**Skjøl**

- *SB_Argir_Argjaboði_2018_3_2021,* journal nr 25/02905-6
- *Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða - Við dagføringum,* journal nr 25/02905-6
- *Kort 1 - Eftir broyting,* journal nr 25/02905-5
- *Kort 1 - Áðrenn broyting*, journal nr 25/02905-5
- *20240124_Myndugleikaprosjekt.pdf,* journal nr 25/02905-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at dagføra serstøku byggisamtyktina fyri Argjaboða sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða - Við dagføringum*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Birgir Nielsen tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Heidi Lava Elgeirsdóttir taka ikki undir við tilmælinum.

Kári Johansen atkvøður blankt. Birgir Nielsen og Kári Johansen krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt at beina málið aftur í nevnd.

# 138/25 Innskriving í forskúla, fyrsta flokk og frítíðarskúla skúlaárið 2025/26

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 13.02.2025 | 8/25 | 25/00093-7 |
| 2 Mentamálanevndin | 12.02.2025 | 16/25 | 25/00093-7 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 13.03.2025 | 14/25 | 25/00093-7 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 08.05.2025 | 31/25 | 25/00093-7 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 138/25 | 25/00093-7 |

**Upprunin til málið**
Innskriving í forskúla, fyrsta flokk og frítíðarskúla til skúlaárið 2025/26

**Lýsing av málinum**
Innskrivingin skúlaárið 2025/26 var opin frá mikudegnum 11. desember 2024 til og við týsdegnum 15. januar 2025. Innskrivingin er í Plássávísingarskipanini á torshavn.fo
Nú innskrivingin í fyrsta flokk og forskúla er liðug eru 343 børn skrivað inn í fyrsta flokk og 160 skrivað inn í forskúla. Av teimum eru 8 børn skrivað inn í forskúla og 10 børn skrivað inn í fyrsta flokk í Lítlaskúla. Tvey børn eru bæði skrivað í kommunalan skúla og Lítlaskúla, men hava ikki tikið endaliga støðu enn, um barnið fer í frískúla ella ikki.

**Tillutan av plássum til fyrsta flokk**
Plássini eru tillutað eftir leiðreglunum fyri upptøku av børnum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu.

Mentamáladeildin hevur sent teldupost til foreldrini hjá teimum børnum, sum ikki fingu pláss í tí skúla, sum tey ynsktu. Í teldupostinum er upplýst, hvussu nógv børn ikki fáa pláss í  skúlanum, og hvørjum skúla barnið fær pláss í, og at møguleiki er at koma á bíðilista. Kunnað er eisini um meginreglurnar, ið eru brúktar, tá avgerð er tikin um plássini. Tær eru hesar:

1. Barnið gongur í forskúla í skúlanum
2. Innskrivingin er komin, áðrenn freistin er farin
3. Barnið hevur systkin í skúlanum
4. Barnið býr í grundupptøkuøkinum hjá skúlanum
5. Onnur serlig viðurskifti

**Fyrsti flokkur**
Tað er ikki pláss fyri øllum børnunum í teimum skúlunum, sum tey eru skrivað inn í í fyrsta flokk, og nú næmingatalið sambært fólkaskúlalógini er farið úr 24 næmingum niður á 22, er neyðugt at stovna ein flokk aftrat í Tórshavnar kommunu. Mentamáladeildin hevur samskift við Undirvísingarstýrið um tað og sent stýrinum fyrispurning um ætlanina at stovna ein flokk aftrat.

Sankta Frans skúli og Eysturskúlin hava pláss at taka flokkar inn aftrat. Í Eysturskúlanum er bert ein flokkur í 4. árgangi, og tað sama er í 5. árgangi. Í Sankta Frans skúla er pláss, tí 7. flokkur er nú í nýggja bygninginum, so tvær skúlastovur eru tøkar í høvuðsbygninginum. Umframt tað er bert ein 9. flokkur skúlaárið 2025/26.

Tað er serliga næmingatalið á Argjum, í miðbýnum og í vesturbýnum, sum er høgt, og tí er Sankta Frans skúli besta boð til at taka ein flokk aftrat, og pláss verður so í miðbýnum til børn, sum møguliga flyta til kommununa.

Undirvísingarstýrið hevur svarað, at nú mesta næmingatalið skal vera 22 í hvørjum flokki, so mugu 14 spor til í Havn við tí næmingagrundarlagi, sum Tórshavnar kommuna hevur upplýst. Tískil verða tað 14 spor í 1. flokki skúlaárið 2025/26, um innskrivingin pr. 1. februar 2025 og aftur pr. 1. september 2025 koma at liggja á tí støði, sum Tórshavnar kommuna hevur upplýst.

Í skrivinum frá Undirvísingarstýrinum stendur eisini;" Hvar hetta eyka sporið skal verða skipað, er nokk grundleggjandi ein avgerð hjá Tórshavnar kommunu at taka, nú eingin av skúlunum er upplagdur at taka ímóti tí. Og tá er Sankta Frans óivað líka væl egnaður sum onkur annar av skúlunum."

**Tal á innskrivaðum børnum í ymsu skúlarnar**

| **Skúlar** | |
|---|---|
| | Innskr. |
| Eysturskúlin | 43 |
| Hoyvíkar sk. | 29 |
| Kaldbaks skúli | 6 |
| Kollafjarðar skúli | 17 |
| Nólsoyar sk. | 0 |
| Sankta Frans skúli | 50 |
| Skúlin á Argjahamri | 50 |
| Skúlin á Fløtum | 72 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 57 |
| Velbastaðar skúli | 10 |
| Lítliskúli | 10 |
| tils. | 343 |

*Sankta Frans skúli* - 50 børn eru skrivað inn í Sankta Frans skúla, har er pláss fyri 44 børnum, 22 í hvørjum flokki. men tað eru 6 ov nógv børn skrivað inn til tveir flokkar.

*Skúlin á Argjahamri* – 50 børn eru skrivað inn í Skúlan á Argjahamri, har er pláss fyri 44 næmingum, men í hesum føri verða 46 tikin inn. 25 ganga í forskúla, 8 hava systkin, og 13 búgva í økinum. Tann eini av teimum 46 næmingunum fer væntandi í annað skúlatilboð, og tað bar illa til við støði í leiðreglunum at taka støðu til, hvør tann eini, sum ikki fekk pláss skuldi vera. Fýra av børnunum hava fingið boð um, at tey fáa pláss í Sankta Frans skúla, ein býr í økinum hjá Skúlanum á Argjahamri, men umsóknin er komin eftir, at freistin er farin, og hini trý búgva í øðrum grunduppt økuøki, tvey teirra hava upplýst, at tey flyta út á Argir, tann eina familjan flytur eftir ætlan nú í februar ella í mars.

*Skúlin á Fløtum* – 72 børn eru skrivað inn í Skúlan á Fløtum, 66 børn verða tikin inn, 61 av teimum ganga í forskúla, 4 hava systkin og ein býr beint við skúlan. Seks av børnunum hava fingið boð um, at tey fáa pláss í Sankta Frans skúla. Av teimum er ein umsókn komin eftir, at freistin er farin, trý búgva í økinum og tvey búgva uttanlands.

*Skúlin við Løgmannabreyt* – 57 børn eru skrivað inn í Skúlan við Løgmannabreyt, og 45 børn verða tikin inn, tí tað ber illa til at taka dagar ímillum, hvør av teimum 45 ikki skal fáa pláss. Eitt av børnunum hevur eisini fingið pláss í Lítlaskúla, so talið kemur kanska niður á 44. Foreldrini hjá 12 av børnunum hava fingið boð um, at tey fáa pláss í fyrsta flokki í Hoyvíkar skúla. ein av teimum býr uttanlands, hini 11 búgva í grunduppt økuøkinum hjá skúlunum í Hoyvík.

**Tillutan av plássum til forskúla**

Plássini eru tillutað eftir leiðreglunum fyri upptøku av børnum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu. Fleiri børn enn pláss er fyri eru skrivað inn í forskúla í Sankta Frans skúla, og mentamáladeildin hevur sent foreldrunum hjá teimum børnum, boð um, at tey ikki fáa pláss í forskúla. Kunnað er eisini um meginreglurnar, ið eru brúktar, tá avgerð er tikin um plássini. Tær eru hesar:

1. Innskrivingin er komin, áðrenn freistin er farin
2. Barnið hevur systkin í skúlanum
3. Barnið býr í grundupptøkuøkinum hjá skúlanum

**Forskúli**

160 børn eru skrivað inn í forskúla í Tórshavnar kommunu. Innskriving býtt á ymsu forskúlarnar:

| Forskúlar | Innskr. |
|---|---|
| Kaldbaks skúli | 3 |
| Kollafjarðar skúli | 0 |
| Sankta Frans skúli | 55 |
| Skúlin á Argjahamri | 29 |
| Skúlin á Fløtum | 65 |
| Lítliskúli | 8 |
| | 160 |

*Kollafjarðar skúla* – tað er fyrsta árið, at tað ber til at skriva inn í forskúla í Kollafjarðar skúla. Skúli og barnagarður/frítíðarskúli høvdu kunningarfund fyri foreldrum um forskúla, frítíðarskúla og barnagarð. Einki barn er skrivað inn í forskúla.

*Sankta Frans skúli* – 55 innskrivingar eru, men pláss er bert fyri 44 børnum, so neyðugt er, at 11 børn halda fram í barnagarði. Foreldrini hjá 11 børnum hava sostatt fingið boð um, at tey ikki fáa pláss í forskúla. Av teimum hava trý søkt eftir, at freistin er farin, og 8 børn búgva í øðrum grundupptøkuøki.

*Skúlin á Fløtum* – 65 børn eru innskrivað í Skúlan á Fløtum. Har er pláss fyri 66 børnum, so tey fáa øll pláss í forskúlanum.

**Eyka flokkur í Sankta Frans skúla**
Tað er ein stórur árgangur, sum byrjar í fyrsta flokki komandi skúlaár, og í flestu skúlunum verða eingi ella bert fá tøk pláss. Eykaflokkurin í Sankta Frans skúla fer tó at hava tøk pláss, so flestu børn í hesum árganginum, sum flyta til Havnar, fara at fáa pláss har.

Niðanfyri er talva, sum vísir, hvussu nógvir fyrstu flokkar verða í stóru skúlunum, hvussu nógv børn hava fingið pláss í teimum, og hvussu nóg  tøk pláss verða í fyrstu flokkunum í stóru skúlunum.

| Skúlar | flokkar | næmingatal | Tøk pláss |
|---|---|---|---|
| Eysturskúlin | 2 | 43 | 1 |
| Hoyvíkar skúli | 2 | 41 | 3 |
| Sankta Frans skúli | 3 | 60 | 6 |
| Skúlin á Argjahamri | 2 | 46 | 0 |
| Skúlin á Fløtum | 3 | 66 | 0 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 2 | 45 | 0 |

Broytingin í fólkaskúlalógini um næmingatal í hvørjum flokki kemur í gildi 1. juli í 2025.

§ 20. Næmingatalið í hvørjum flokki eigur við skúlaársbyrjan ikki at vera hægri
enn 22. Hetta verður galdandi frá skúlaárinum 2025-26, tá byrjað verður við 1. flokki og síðani
endaliga sett í gildi eftir níggju árum.

Stk. 2. Er næmingatalið í einum flokki hægri enn 22, kann skúlaleiðarin í ávísum førum avgera ikki at býta flokkin í tveir flokkar."

Bæði Eysturskúlin og Sankta Frans skúli hava møguleika at taka ein eyka fyrsta flokk, men umsitingin hevur tikið avgerð um, at flokkurin verður í Sankta Frans skúla, tí tað er serliga á Argjum, í vesturbýnum og í miðbýnum, at næmingatalið er høgt, og skúlavegurin hjá teimum er styttri í Sankta Frans skúla enn í Eysturskúlan. Haraftrat verður tað, so skúlin í miðbýnum, sum hevur pláss til næmingar, sum flyta til kommununa.

**Frítíðarskúli til ein eyka flokk**
Barna- og ungdómsdeildin hevur gjørt vart við, at Smílibýlið, sum er frítíðarskúlin, ið børnini í Eysturskúlanum ganga í, hevur ikki pláss fyri fleiri børnum, og tað sama er galdandi fyri Frítíðarskúlan í Badmintonhøllini, sum børnini í Sankta Frans skúla ganga í.

Neyðugt verður tí at finna eina loysn, so pláss verður fyri øllum børnunum í Sankta Frans skúla í frítíðarskúla eisini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 25 frá 20. Juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Barna- og ungdómsdeildin skal gera vart við, at frítíðarskúlin í Badmintonhøllini er normeraður til 100 børn í 1. og 2. flokki. Skúlin er tvísporaður við 48-52 næmingum í hvørjum árgangi.

Harafturat hevur stovnurin eina sereind. Málbólkurin er eldri barnagarðsbørn. Barnatalið er 5 børn í miðal.

Verður 1. flokkur trýsporaður við 60-66 børnum í árganginum, so verður ikki pláss fyri øllum børnum í 1. flokki. Tí er átrokandi neyðugt at útvega fleiri fermetrar til frítíðarskúlan tey næstu tvey árini hesi børn fara at brúka frítíðarskúlatilboðið.

Mælt verður til at útvega eina fyribils lon á økinum við Badmintonhøllina, sum skal standa klár at taka í nýtslu til skúlaársbyrjan í summar.

Barna- og ungdómsdeildin leggur málið fyri mentamálanevndina á nevndarfundinum í mars við uppskoti um loysn til fígging.

**Skjøl**
25/00101-3 Leiðreglur fyri upptøku av næmingum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 12. februar 2025:** Tikið til eftirtektar. Nevndin heitir á umsitingina um at gera eitt tilmæli við varandi loysn fyri frítíðarskúlar 2025-2026.

**Trivnaðarnevndin 13. februar 2025:** Tikið til eftirtektar. Nevndin heitir á umsitingina um at taka upp samskifti við undirvísingarstýrið um innskrivingarnar um fleiri spor í Tórshavnar kommunu.

**Ískoyti:**
Mentamáladeildin hevur samskift við Undirvísingarstýrið um innskriving í 1. flokk, og støðuna, at allir næmingar ikki hava fingið pláss í skúlanum, sum er í grundupptøkuøkinum, sum teir búgva í. Umsitingin hevur spurt, um frávik kunnu verða givin skúlaárið 2025/26. Undirvísingarstýrið heldur seg til nýggju ásetingarnar í lógini, sum eru 22 næmingar í hvørjum flokki, sum hægst loyvda næmingatal frá skúlaárinum 2025/26.

*"§ 20. Næmingatalið í hvørjum flokki eigur við skúlaársbyrjan ikki at vera hægri enn 22.*
*Hetta verður galdandi frá skúlaárinum 2025-26, tá byrjað verður við 1. flokki og síðani endaliga sett í gildi eftir níggju árum.*
*Stk. 2. Er næmingatalið í einum flokki hægri enn 22, kann skúlaleiðarin í ávísum førum avgera ikki at býta flokkin í tveir flokkar."*

Í viðmerkingum til uppskotið um broytingar í fólkaskúlalógini stendur m.a. um orsøkir til uppskotið, at í 2023 varð álit handað landsstýrismanninum um broytingar í fólkaskúlalógini, umframt at úrslit frá einari trivnaðarkanning vóru almannakunngjørd. Í álitinum sæst m.a., hvussu stóran týdning tað hevur, at vit hava eina skipan, sum tekur nøktandi atlit at støddini á tí einstaka flokkinum, soleiðis at henda sampakkar við nøktandi tíð til tann einstaka næmingin. Í álitinum verður m.a mælt til, at næmingatalið ikki fer uppum 20.

Í upprunauppskotinum til lógarbroytingina var hægsta næmingatalið 20, men var so seinni broytt til 22.

Um ynski er at broyta næmingatalið í 1. flokkunum komandi skúlaár, er sostatt neyðugt, at leiðslan í Tórshavnar kommunu samskiftir við Barna- og útbúgvingarmálaráðið, og møguliga sendir umsókn um frávik.

**Møguligt undantak**

Mentamáladeildin metir ikki, at tað er rætt at søkja um undantak frá næmingahámarkinum, hóast pláss ikki er fyri øllum næmingum í skúlum, sum eru í nøkrum grundupptøkuøkjum, sum teir búgva í.

1. Umráðandi er at virða nýggju lógarásetingina um næmingahámark, sum er sett í verk fyri at betra um trivnaðin og læringina í fólkaskúlanum. Støðan hjá teimum familjum og børnum teirra, sum tað ikki er

pláss til í skúlanum í teirra grundupptøkuøki, er keðilig, men hinir næmingarnir hava rætt til, at støddin á flokkunum verður skipað eftir næmingahámarkinum í lógini.
2. Sambært samtyktu leiðreglunum verður strembað eftir at veita næmingunum pláss í skúla í grundupptøkuøkinum ella í einum av teimum nærmastu skúlunum, og umsitingin hevur fylgt leiðreglunum við at skipa eykaflokkin í skúlanum í miðbýnum, har tað eru hølir tøk til eyka flokk.
3. Verður biðið um loyvi at fara uppum næmingahámarkið, ber ikki til at gera tað fyri eitt grundupptøkuøki í Tórshavnar kommunu og ikki hini. Í núverandi innskriving er talan um børn, ið hava skrivað seg inn í skúlan og búgva í grundupptøkuøkinum hjá skúlanum á Argjahamri og Skúlanum á Fløtum, umframt børn, sum búgva í grundupptøkuøkinum í Hoyvík og hava skrivað seg inn í Skúlan við Løgmannabreyt.
4. Ein umbøn um undantak verður heldur ikki bert galdandi fyri innskrivingina í ár, tí støðan verður á leið tann sama komandi tvey árini, men eftir tað minka árgangirnir munandi.
5. Fyri umsitingina og álitið á kommununa er tað best, um umsitingin avgreiðir innskrivingina eftir teimum leiðreglunum, sum eru samtyktar í trivnaðarnevndini. Um býráðslimir eru ónøgdir við støddina á skúlatilboðunum, skúlabygnaðin ella leiðreglurnar fyri innskriving, so er møguleiki at taka hesi viðurskifti upp til viðgerðar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða málið.

**Trivnaðarnevndin 13. mars 2025:** Nevndin heitir á leiðsluna, um at søkja um undantak so næmingar sleppa at ganga í skúla í grundupptøkuøkinum í tann mun tað er skynsamt.

**Ískoyti:**

**Umsókn til Barna- og útbúgvingarmálaráðið og svar**
Tórshavnar kommuna hevur sent Barna- og útbúgvngarmálaráðnum, stílað landsstýrismanninum, umsókn um undantak at taka fleiri næmingar inn í fyrsta flokk í Skúlan á Argjahamri.

Í skrivinum verður víst á, at eftir at foreldur høvdu fingið boð um, at børn teirra ikki fingu pláss í tí skúla, tey høvdu skrivað tey inn í, vendu nøkur sær til kommuna og gjørdu vart við, at tey vóru hørm um støðuna, onkur teirra bóðu um undantak frá mesta næmingatalinum, og onnur sendu áheitan um at stovna ein flokk aftrat á Argjum.

Tað eru serliga foreldur, sum búgva í grundupptøkuøkinum hjá Skúlanum á Argjahamri og tey sum fara at flyta í økið, sum hava gjørt vart við seg.

Í umsóknini til Barna- og útbúgvingarmálaráðið verður í fyrsta lagi biðið um, at játtaðir verða tímar til ein eykaflokk á Argjum eisini, so tímar verða játtaðir til tveir eykaflokkar í Tórshavnar kommunu.

Í øðrum lagi verður biðið um, at tímar verða játtaðir Skúlanum á Argjahamri eftir skipanini, sum hevur verði galdandi til nú, so næmingatalið omanfyri 22 eisini gevur tímar til tvílæraraskipanina.

Í svarinum vísir ráðið á komandi lóggávu, sum er galdandi frá skúlaárinum 2025/26, at næmingatalið í hvørjum flokki eigur við skúlaársbyrjan ikki at vera hægri enn 22, og at lógin gevur ikki beinleiðis heimild at víkja frá ásetingunum.

Í svarskrivinum stendur m.a.: *"Verður vikið frá í fyriliggjandi føri, so má víkjast frá á øllum teimum skúlum, sum fáa umbøn um fleiri næmingar enn pláss er fyri, tí annars verður brotið við líkheitsmeginregluna. Allir næmingar, óansæð um talan er um Skúlan á Argjahamri, Skúlan á Fløtum ella aðrastaðnis, eiga at vera líkastillaðir."*

Barna- og útbúgvingarmálaráðið gongur ikki umsóknini frá Tórshavnar kommunu á møti, hvørki at játta eitt eyka spor í Skúlanum á Argjahamri ella fara upp um 22 næmingar í hvørjum flokki við verandi tvílæraraskipan, ið fer úr gildi við skúlaársbyrjan 2025/26.

**Dagførd tøl frá innskriving og tøk pláss**
Nakrar innskrivingar eru komnar aftrat, og onkrar tiknar aftur, tí fólk eru flutt. Niðanfyri er dagførd talva, sum vísir hvussu nógvir fyrstu flokkar verða í stóru skúlunum, hvussu nógv børn hava fingið pláss í teimum, og hvussu nógv tøk pláss verða í fyrstu flokkunum í stóru skúlunum. Tvey av børnunum, sum telja við í talvuni niðanfyri eru skrivað inn í ávikavist Sankta Frans skúla og Eysturskúlan, og eisini í Lítlaskúla, men umsitingin hevur ikki fingið endaligt svar um, hvørjum plássi tey taka av. Tøku plássini í fyrsta flokki í kommunalu skúlunum í miðstaðarøkinum eru sostatt millum 5 og 7.

| Skúlar | flokkar | næmingatal | Tøk pláss |
|---|---|---|---|
| Eysturskúlin | 2 | 44 | 0 |
| Hoyvíkar skúli | 2 | 44 | 0 |
| Sankta Frans skúli | 3 | 61 | 5 |
| Skúlin á Argjahamri | 2 | 45 | 0 |
| Skúlin á Fløtum | 3 | 72 | 0 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 2 | 45 | 0 |

Í talvunum niðanfyri er talið á innskrivingum í skúlarnar og forskúlarnar. Fyrra talvan eru tølini, sum vísa, hvussu nógv børn hava fingið pláss í hvørjum skúla. Seinna talvan eru tølini soleiðis, sum foreldrini hava skrivað børnini inn í skúla og forskúla. Reyðu tølini vísa, at har eru ov nógv skrivað inn til plássini, sum eru í ymsu skúlunum, undantikið fyrsti flokkur Sankta Frans skúla, tí har verður ein eyka flokkur, tvs. 3 flokkar.

| Skúlar | |
|---|---|
| | Næmingar fingið pláss |
| Eysturskúlin | 44 |
| Hoyvíkar sk. | 44 |
| Kaldbaks skúli | 6 |
| Kollafjarðar skúli | 20 |
| Nólsoyar sk. | 0 |
| Sankta Frans skúli | 61 |
| Skúlin á Argjahamri | 45 |
| Skúlin á Fløtum | 66 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 45 |
| Velbastaðar skúli | 10 |
| Lítsliskúli | 10 |
| tils. | **351** |
| | |
| Forskúlar | |
| Kaldbaks skúli | 3 |
| Kollafjarðar skúli | 0 |
| Sankta Frans skúli | 44 |
| Skúlin á Argjahamri | 44 |
| Skúlin á Fløtum | 64 |
| Lítliiskúli | 10 |
| tils. | **165** |

| Skúlar | |
|---|---|
| | Foreldur skrivað inn |
| Eysturskúlin | 43 |
| Hoyvíkar sk. | 32 |
| Kaldbaks skúli | 6 |
| Kollafjarðar skúli | 20 |
| Nólsoyar sk. | 0 |
| Sankta Frans skúli | 50 |
| Skúlin á Argjahamri | 50 |
| Skúlin á Fløtum | 73 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 57 |
| Velbastaðar skúli | 10 |
| Lítsliskúli | 10 |
| tils. | **351** |
| | |
| Forskúlar | |
| Kaldbaks skúli | 3 |
| Kollafjarðar skúli | 1 |
| Sankta Frans skúli | 57 |
| Skúlin á Argjahamri | 44 |
| Skúlin á Fløtum | 64 |
| Lítsliskúli | 10 |
| tils. | **179** |

45 børn eru tikin inn í Skúlan á Argjahamri, men eitt teirra fer væntandi í Skúlan á Trøðni. 45 børn eru eisini tikin inn í Skúlan við Løgmannabreyt, eitt teirra hevði eisini fingið pláss í Lítlaskúla, men tók ikki av tí plássinum.

14 børn hava ikki fingið pláss í forskúla, eitt í Kollafjarðar skúla og 13 í Sankta Frans skúla, tey eru tó ikki skrivað úr úr dagstovninum og halda so fram har.

**Ávirkan millum  innskriving í 1. flokk og innskriving í forskúla**

Í innskrivingini standast avbjóðingar av, at Tórshavnar kommuna bæði bjóðar forskúlatilboð og 6 ára stovur.

Ein avleiðing av hesum er, at í skúlum við forskúlum, bindir tað innskriving í 1. flokk, og kann forða fyri eini neyðugari tillaging millum skúlaøkini í mun til næmingatalið.

Innskriving til 1. flokk 2025/26 er eitt dømi um hetta, tí av teimum 66 næmingunum, sum hava pláss í fyrsta flokki í Skúlanum á Fløtum ganga 61 í forskúla, 4 hava systkin og ein býr beint við skúlan. Orsaka av hesum var ikki gjørligt at flyta markið millum Skúlan á Argjahamri og Skúlan á Fløtum, og tí var neyðugt at flyta børn, ið hoyra til Skúlan á Argjahamri í Sankta Frans skúla.

Ein onnur avleiðing er, at tørvurin á forskúlaplássum økist, tá vøkstur í barnatalinum førir til plásstrot í 1. flokki, sum dømi  nú er um í innskriving í forskúlan í Skúlan á Argjahamri

Hóast Skúlin á Argjahamri er góðkendur við tveimum forskúlaflokkum, hevur tað higartil bert verið ein flokkur, av tí at árgangirnir ikki hava verið so stórir, og at ein partur av árganginum hevur valt at halda fram á 6 ára stovu í barnagarði.

Nú árgangirnir gerast størri, eru náttúrliga fleiri, ið velja forskúla, umframt at flestu foreldrini, ið vita, at tað verður plásstrot í 1. flokki, velja forskúla fyri at tryggja sær pláss í 1. flokki skúlaárið 2026/27.

Av 27 innskrivingum innan freistina hálvan januar, eru 26 innskrivað. Eini foreldur hava boðað frá, at tey heldur halda áfram á dagstovni. 18 innskrivingar eru síðani móttiknar eftir freistina. Nøkur av hesum foreldrunum gera í viðmerking vart við, at tey ynskja at halda áfram í 6 ára stovu á dagstovni, men kenna seg noydd at innskriva fyri at tryggja sær pláss í 1. flokki. Við hesum innskrivingunum koma vit upp á 44 børn, sum er næmingahámarkið í tveimum 1. flokkum skúlaárið 2026/27

Økingin av forskúlanum við einum flokki gevur eitt stórt trýst á hølisviðurskiftini hjá grunddeildini og frítíðarskúlanum, og verður tað tí arbeitt við tekning, góðkenning og kostnaðarmeting av eini bráðfeingis tillaging av hølunum, ið gevur meira pláss til forskúlan og til frítíðarskúlan.

Eftir at leiðslan í kommununi hevur tikið avgerð um at innskriva upp til 44 børn í forskúla, hava foreldrini fingið boð um innskrivingina og freist til 5. mai at boða frá, um tey ikki taka av.

Um ein loysn verður funnin har pláss verður fyri øllum næmingunum í grunduppt økuøkinum til skúlaárið 2026/27 er møguligt at ein partur av foreldrunum tekur innskrivingina aftur og heldur velja eitt ár afturat í 6 ára stovu á dagstovni.

Í løtuni eru 48 børn skrásett at búgva í grundupptøkuøkinum  hjá Skúlanum á Argjahamri, umframt at tað kann væntast ein ávís tilflyting av børnum, so tørvur verður eisini á fleiri plássum í 1. flokki skúlaárið 2026/27, um pláss skal verða fyri øllum børnunum í Skúlanum á Argjahamri.

**Skriv frá Skúlanum á Fløtum**

Skúlin á Fløtum ger vart við, at hóast støðan har pláss ikki er til øll børn í skúlanum í teirra grunduppptøkuøki er ordiliga keðilig, so er hon ikki serlig fyri grunduppptøkuøkið á Argjum. Sama støða er og hevur áður verið í øðrum grunduppptøkuøkjum.

Skúlin undrast á, at bert støðan á Skúlanum á Argjahamri verður umrødd og ikki hinir yvirteknaðu skúlarnir.

Í mun til at skúlin hoyrir, at møguligur eyka flokkur á Argjahamri skal geva eyka fyribilshølir, verður sagt frá, at tá Skúlin á Fløtum fyri 4 árum síðani var í somu støðu og tók eyka flokk inn. Hetta var gjørt uttan, at skúlin fekk eyka høli, og tí hevur skúlin ikki havt tónleikastovu síðani og fær tað ikki aftur fyrr enn skúlaárið 2027/28.

Um fyrisitingin á hesum økinum verður broytt soleiðis, at eyka flokkar geva eyka hølir ynskir Skúlin á Fløtum at fáa somu viðgerð.

**Skúlaumdømi og grundupptøkuøkir**

Í § 29, stk.1 í fólkaskúlalógini stendur, at skúlamyndugleikin á staðnum býtir vanliga sítt øki upp í skúlaumdømi, ið kunnu vera størri fyri skúlans eldru floksstig enn fyri tey yngru.

Í § 32, stk 1, 1) stendur, at nøvnini á umdømunum skulu tilskilast, og smærri umleggingar av umdømunum kunnu verða gjørdar í sambandi við ta árligu innskrivingina.

Tórshavnar kommuna hevur býtt sítt øki upp í grundupptøkuøki, sum í grundini er tað sama sum skúlaumdømi.

Her er eitt leinki til grundupptøkuøkini
https://umhvorvi.maps.arcgis.com/apps/instant/basic/index.html?appid=9cbfc91b21bd4ccd992aa79125b29ea2

Skúlarnir í miðstaðarøkinum og smáu skúlarnir á bygd hava upptøkuøki. Tó er tað soleiðis, at meðan mørkini fyri upptøkuøkini í miðstaðarøkinum kunnu flyta seg frá einum ári til tað næsta, tí tey verða lagað eftir talinum á børnum í økjunum, so eru upptøkuøkini fyri smærru skúlarnar føst (Kollafjarðar skúli, Kaldbaks skúli, Velbastaðar skúli og Nólsoyar skúli). Bara tey, sum búgva í hesum økjunum, kunnu skrivast inn í skúlarnar har. Í einstøkum førum ganga tó børn úr øðrum økjum í ein av skúlunum á bygd.

Skúlarnir í bygdunum umfata hesi øki:
Velbastaðar skúli er til næmingar búsitandi í Kirkjubø og á Velbastað
Kaldbaks skúli er til næmingar búsitandi í Kaldbak og í Kaldbaksbotni
Nólsoyar skúli er til næmingar búsitandi í Nólsoy
Kollafjarðar skúli er til næmingar búsitandi í Kollafirði, Signabø og á Oyrareingjum.

Tá pláss ikki er fyri øllum børnum, sum búgva í einum upptøkuøki, hevur mannagongdin verið tann, at tey fáa pláss í einum av hinum skúlunum. Vanliga hevur tað verið í grannaskúlanum, men í ár ber t.d. ikki til at flyta børn av Argjum í Skúlan á Fløtum, tí tey børn sum hava fingið pláss har, ganga í forskúla, hava systkin ella búgva beint við skúlan.

**Støðan í Tórshavnar kommunu sammett við aðrar kommunur**

Hóast fleirsporaðu skúlarnir í Tórshavnar kommunu hava tilhoyrandi grundupptøkuøkir (skúlaumdømi), verður skúlaøkið í TK frá Argjum til Hoyvíkar roknað sum eitt skúlaøkið, tá tørvur er á eyka flokki ella flokkum fyri at nøkta tørvin á skúlaplássum. Tí eru komandi 1. flokkar fullir við 22 børnum í øllum fleirsporaðu skúlunum uttan Sankta Frans skúla, sum við eyka flokki hevur flokkar á 20, 20 og 21 næmingar og 5 tøk pláss.

Samanborið við aðrar kommunur við fleirsporaðum skúlum ,verða hølisumstøðurnar og læraratímarinir betur gagnnýttar TK.  Hóast miðal næmingatalið eisini er høgt í Eysturkommunu, Fuglafjarðar -, Klaksvíkar- og Runavíkar kommunu. So skulu bert fá børn leggjast afturat fyri at geva eyka flokk og harvið hægri læraranormering og møguleika at halda áfram við einum flokki við fleiri enn 22 næmingum ella smærri sundurbýttum flokkum.

Dømi um hetta er Nes kommuna, har Tofta skúli  við 27 næmingum fær játtan til 2 flokkar á 13 og 14 næmingar.

Í TK kann bert ein skúli koma í eina slíka støðu, og so verða næmingar, ið leggjast afturat  í hinum grunduppptøkuøkjunum innskrivaðir í tann skúlan.

Her skal gerast vart við, at Tórshavnar kommuna eisini hevur smærri bygdaskúlar og  ein 1 sporaðan skúla í Kollafirði, har tørvurin á skúlaplássum skal verð loystur í bygdini. Í hesum skúlum er næmingatlið í flokkunum lægri og miðalnormering og kostnaður pr næming hægri.

**Fundur við skúlatjórar**
Á fundi hósdagin 1. mai við skúlatjórarnar í kommunalu fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu var eitt av málinum á skrá - innskriving í forskúla og fyrsta flokk og manglandi pláss í skúlum í summum av gundupptøkuøkjunum og møguligar broytingar.

Skúlastjórar høvdu hesar viðmerkingar:

Ein trupulleiki er, at ikki allir skúlar hava forskúla. Tí býr tú í einum grundupptøkuøki, sum ikki hevur forskúla, og tú metir, at forskúli er rætta tilboðið til títt barn, má tú skriva tað upp í forskúla í øðrum øki. Men møguleikin at fáa pláss er lítil, tí børn í grundupptøkuøkinum verða raðfest fremri.

Ein onnur avbjóðing er, at tey børn sum ganga í forskúla eru skrivað inn í skúlan og hava tí  pláss í fyrsta flokki, eisini tey, sum búgva í einum øðrum øki.

Tórshavnar kommuna eigur at gera sær greitt, hvat hon vil. Tað kann ikki vera rætt, at tí nøkur foreldur larma, so skal so nógv broytast. Argir er ein býarpartur á sama hátt, sum aðrir býarpartar í Tórshavnar kommunu.

Eitt uppskot er, at fyrisitingin fordeilir og ávísir pláss tvey ár undan skúlabyrjan, og foreldur ikki hava møguleikan at velja skúla. Spurningurin er so um tað ber til uttan so, at forskúlar eru í øllum skúlum.

Miðstaðarøkið kundi verið býtt upp í trý skúladømi, eitt fyri Argir og vesturbýin, eitt fyri miðbýin og eysturbýin og eitt fyri Hoyvik. Soleiðis at Skúlin á Argjahamri og Skúlin á Fløtum høvdu felags upptøkuøki, Sankta Frans skúli og Eysturskúlin høvdu felags upptøkuøki og Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt høvdu felags upptøkuøki. Skúlarnir í Hoyvík hava sum er felags upptøkuøki.

Hesi trý øki áttu so at havt ta skipan, at tá ov nógvir næmingar eru til flokkatalið í økinum, so verður játtað til ein flokk aftrat. Tað krevur tó, at Barna- og útbúgvingamálaráðið góðtekur hetta og ikki heldur fast við, at so leingi pláss er í onkrum av skúlunum í miðstaðarøkinum verður ikki játtað til flokkar aftrat.

Tað er stravið hjá skúlunum ikki at vita, hvussu nógvar næmingar teir hava. Í hesum føri er tað serliga skúlin á Argjahamri, sum ikki fær avgreitt allar setanir, tí skúlin veit ikki, hvussu nógv børn koma í forskúla. Í fysrtu atløgu vóru 26, sum fingu pláss. Men so komu 18 aftrat, sum hava freist til 5. mai at boða frá, um tey ikki taka av plássinum.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða málið.

**Fundur við skúlatjórar**
Á fundi hósdagin 1. mai við skúlatjórarnar í kommunalu fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu var eitt av málinum á skrá - innskriving í forskúla og fyrsta flokk og manglandi pláss í skúlum í summum av gundupptøkuøkjunum og møguligar broytingar.

Skúlastjórar høvdu hesar viðmerkingar:

Ein trupulleiki er, at ikki allir skúlar hava forskúla. Tí býr tú í einum grundupptøkuøki, sum ikki hevur forskúla, og tú metir, at forskúli er rætta tilboðið til títt barn, má tú skriva tað upp í forskúla í øðrum øki. Men møguleikin at fáa pláss er lítil, tí børn í grundupptøkuøkinum verða raðfest fremri.

Ein onnur avbjóðing er, at tey børn sum ganga í forskúla eru skrivað inn í skúlan og hava tí  pláss í fyrsta flokki, eisini tey, sum búgva í einum øðrum øki.

Tórshavnar kommuna eigur at gera sær greitt, hvat hon vil. Tað kann ikki vera rætt, at tí nøkur foreldur larma, so skal so nógv broytast. Argir er ein býarpartur á sama hátt, sum aðrir býarpartar í Tórshavnar kommunu.

Eitt uppskot er, at fyrisitingin fordeilir og ávísir pláss tvey ár undan skúlabyrjan, og foreldur ikki hava møguleikan at velja skúla. Spurningurin er so um tað ber til uttan so, at forskúlar eru í øllum skúlum.

Miðstaðarøkið kundi verið býtt upp í trý skúladømi, eitt fyri Argir og vesturbýin, eitt fyri miðbýin og eysturbýin og eitt fyri Hoyvik. Soleiðis at Skúlin á Argjahamri og Skúlin á Fløtum høvdu felags upptøkuøki, Sankta Frans skúli og Eysturskúlin høvdu felags upptøkuøki og Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt høvdu felags upptøkuøki. Skúlarnir í Hoyvík hava sum er felags upptøkuøki.

Hesi trý øki áttu so at havt ta skipan, at tá ov nógvir næmingar eru til flokkatalið í økinum, so verður játtað til ein flokk aftrat. Tað krevur tó, at Barna- og útbúgvingamálaráðið góðtekur hetta og ikki heldur fast við, at so leingi pláss er í onkrum av skúlunum í miðstaðarøkinum verður ikki játtað til flokkar aftrat.

Tað er stravið hjá skúlunum ikki at vita, hvussu nógvar næmingar teir hava. Í hesum føri er tað serliga skúlin á Argjahamri, sum ikki fær avgreitt allar setanir, tí skúlin veit ikki, hvussu nógv børn koma í forskúla. Í fysrtu atløgu vóru 26, sum fingu pláss. Men so komu 18 aftrat, sum hava freist til 5. mai at boða frá, um tey ikki taka av plássinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða málið.

**Fundur við skúlatjórar**

Á fundi hósdagin 1. mai við skúlatjórarnar í kommunalu fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu var eitt av málinum á skrá - innskriving í forskúla og fyrsta flokk og manglandi pláss í skúlum í summum av gunduppptøkuøkjunum og møguligar broytingar.

Skúlastjórar høvdu hesar viðmerkingar:

Ein trupulleiki er, at ikki allir skúlar hava forskúla. Tí býr tú í einum grunduppptøkuøki, sum ikki hevur forskúla, og tú metir, at forskúli er rætta tilboðið til títt barn, má tú skriva tað upp í forskúla í øðrum øki. Men møguleikin at fáa pláss er lítil, tí børn í grunduppptøkuøkinum verða raðfest fremri.

Ein onnur avbjóðing er, at tey børn sum ganga í forskúla eru skrivað inn í skúlan og hava tí pláss í fyrsta flokki, eisini tey, sum búgva í einum øðrum øki.

Tórshavnar kommuna eigur at gera sær greitt, hvat hon vil. Tað kann ikki vera rætt, at tí nøkur foreldur larma, so skal so nógv broytast. Argir er ein býarpartur á sama hátt, sum aðrir býarpartar í Tórshavnar kommunu.

Eitt uppskot er, at fyrisitingin fordeilir og ávísir pláss tvey ár undan skúlabyrjan, og foreldur ikki hava møguleikan at velja skúla. Spurningurin er so um tað ber til uttan so, at forskúlar eru í øllum skúlum.

Miðstaðarøkið kundi verið býtt upp í trý skúladømi, eitt fyri Argir og vesturbýin, eitt fyri miðbýin og eysturbýin og eitt fyri Hoyvik. Soleiðis at Skúlin á Argjahamri og Skúlin á Fløtum høvdu felags upptøkuøki, Sankta Frans skúli og Eysturskúlin høvdu felags upptøkuøki og Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt høvdu felags upptøkuøki. Skúlarnir í Hoyvík hava sum er felags upptøkuøki.

Hesi trý øki áttu so at havt ta skipan, at tá ov nógvir næmingar eru til flokkatalið í økinum, so verður játtað til ein flokk aftrat. Tað krevur tó, at Barna- og útbúgvingamálaráðið góðtekur hetta og ikki heldur fast við, at so leingi pláss er í onkrum av skúlunum í miðstaðarøkinum verður ikki játtað til flokkar aftrat.

Tað er stravið hjá skúlunum ikki at vita, hvussu nógvar næmingar teir hava. Í hesum føri er tað serliga skúlin á Argjahamri, sum ikki fær avgreitt allar setanir, tí skúlin veit ikki, hvussu nógv børn koma í forskúla. Í fysrtu atløgu vóru 26, sum fingu pláss. Men so komu 18 aftrat, sum hava freist til 5. mai at boða frá, um tey ikki taka av plássinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða málið.

**Fundur við skúlatjórar**
Á fundi hósdagin 1. mai við skúlatjórarnar í kommunalu fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu var eitt av málinum á skrá - innskriving í forskúla og fyrsta flokk og manglandi pláss í skúlum í summum av gunduppptøkuøkjunum og møguligar broytingar.

Skúlastjórar høvdu hesar viðmerkingar:

Ein trupulleiki er, at ikki allir skúlar hava forskúla. Tí býr tú í einum grunduppptøkuøki, sum ikki hevur forskúla, og tú metir, at forskúli er rætta tilboðið til títt barn, má tú skriva tað upp í forskúla í øðrum øki. Men møguleikin at fáa pláss er lítil, tí børn í grunduppptøkuøkinum verða raðfest fremri.

Ein onnur avbjóðing er, at tey børn sum ganga í forskúla eru skrivað inn í skúlan og hava tí  pláss í fyrsta flokki, eisini tey, sum búgva í einum øðrum øki.

Tórshavnar kommuna eigur at gera sær greitt, hvat hon vil. Tað kann ikki vera rætt, at tí nøkur foreldur larma, so skal so nógv broytast. Argir er ein býarpartur á sama hátt, sum aðrir býarpartar í Tórshavnar kommunu.

Eitt uppskot er, at fyrisitingin fordeilir og ávísir pláss tvey ár undan skúlabyrjan, og foreldur ikki hava møguleikan at velja skúla. Spurningurin er so um tað ber til uttan so, at forskúlar eru í øllum skúlum.

Miðstaðarøkið kundi verið býtt upp í trý skúladømi, eitt fyri Argir og vesturbýin, eitt fyri miðbýin og eysturbýin og eitt fyri Hoyvik. Soleiðis at Skúlin á Argjahamri og Skúlin á Fløtum høvdu felags upptøkuøki, Sankta Frans skúli og Eysturskúlin høvdu felags upptøkuøki og Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt høvdu felags upptøkuøki. Skúlarnir í Hoyvík hava sum er felags upptøkuøki.

Hesi trý øki áttu so at havt ta skipan, at tá ov nógvir næmingar eru til flokkatalið í økinum, so verður játtað til ein flokk aftrat. Tað krevur tó, at Barna- og útbúgvingamálaráðið góðtekur hetta og ikki heldur fast við, at so leingi pláss er í onkrum av skúlunum í miðstaðarøkinum verður ikki játtað til flokkar aftrat.

Tað er stravið hjá skúlunum ikki at vita, hvussu nógvar næmingar teir hava. Í hesum føri er tað serliga skúlin á Argjahamri, sum ikki fær avgreitt allar setanir, tí skúlin veit ikki, hvussu nógv børn koma í forskúla. Í fysrtu atløgu vóru 26, sum fingu pláss. Men so komu 18 aftrat, sum hava freist til 5. mai at boða frá, um tey ikki taka av plássinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða málið.

**Trivnaðarnevndin 08. mai 2025:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Kári Johansen biður um at fáa málið á skrá til fyrst komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Umrøtt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>22. mai 2025 | Blað nr.: 392 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 139/25 Limaskapur í Kommunufelagnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 139/25 | 25/05714-1 |

**Upprunin til málið**
Annfinn Brekkstein ynskir málið á skrá til umrøðu og støðutakan.

**Lýsing av málinum**
Annfinn Brekkstein vísir á, at Tórshavnar kommuna rindar kr. 4.967.154 í gjøldum til Kommunufelagið, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Barnaverndarstovuna og SSP.

Sett verður spurnartekin við, um tað ikki er betri fyri kommununa, at hon tók seg úr Kommunufelagnum. Kommunan kann umboða seg sjálva og harvið hava fulla ávirkan á støðutakanina og ikki lata hetta upp í hendurnar á Kommunufelagnum.

Víst verður á, at kommunan hevur eina umsiting, sum hevur fullan førleika at loysa hesar uppgávur og kommunan harvið havt størri ávirkan.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

| | **Tórshavnar k** | Hinar komm. | |
|---|---|---|---|
| Kommunufelagið | 2.381.019,84 | 3.205.570,16 | |
| Kommunala Arbeiðsgevarafelagið | 919.681,53 | 1.238.168,47 | |
| Barnaverndarstovan | 1.410.731,00 | 1.899.269,00 | |
| SSP | 255.721,63 | 344.278,37 | |
| **Í alt** | **4.967.154,00** | 6.687.286,00 | 11.654.440,00 |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>22. mai 2025 | Blað nr.: 393<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Umrøtt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 23:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen |
| | Birgir Nielsen | |